Landssjúkrahúsið

KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS

almannaverkið

Kommunufelagið

# Avtala um fleirpartasamstarv millum Sjúkrahúsverk Føroya (Landssjúkrahúsið og Klaksvíkar Sjúkrahús) og Almannaverkið og Kommunalu samstarvsøkini innan eldraøkið og Tórshavnar Kommunu

::::::::::::::

3. mars 2015

*§ 1. Avtalupartar* ........ 3
*§ 2. Endamál* ........ 3
*§ 3. Allýsingar* ........ 3
*§ 4. Skipan av tænastunum og samstarvinum* ........ 3
*§ 5. Samstarvsøki* ........ 3
*§ 6. Stýribólkur* ........ 4
*§ 7. Fundarinnkalling* ........ 4
*§ 8. Fundarfrásøgn* ........ 4
*§ 9. Skoðan* ........ 4
*§ 10. Tíðarskeið og uppsøgn* ........ 4
*§ 11. Rættindaviðurskifti* ........ 4
*§ 12. Tagnarskylda og víðarilating av upplýsingum* ........ 4
*§ 13. Force majeure* ........ 5
*§ 14. Kontaktpersónar* ........ 5
*§ 15. Fráboðanir millum partarnar* ........ 5
*§ 16. Ábyrgd- og ábyrgdarfráskriving* ........ 5
*§ 17. Undirskriving og heildin av sáttmálanum* ........ 5
*Fylgiskjal 1 – Útskrivingarmannagongdir somatikk, psykiatri og uttanlandsøkið* ........ 7
*Fylgiskjal 2 - Mannagongd í samband við at óhjálpnir borgarar sum koma til ambulanta viðtalu á LS/KS* ........ 29
*Fylgiskjal 3 – Smittuverjufrøði* ........ 30
*Fylgiskjal 4 – Medisinsk samstarvsøki* ........ 30
*Fylgiskjal 5 – Skurðsamstarvsøki* ........ 30
*Fylgiskjal 6 – Psykiatrisk samstarvsøki* ........ 31
*Fylgiskjal 7 - Samstarv innan eftir- og víðariútbúgving* ........ 40
*Fylgiskjal 7 – Felagsgoymslan á LS* ........ 41
*Fylgiskjal 8 – Hjálpitól* ........ 41
*Fylgiskjal 9 – Endurvenjing (fysioterapi, ergoterapi vm.)* ........ 43
*Fylgiskjal 10 – Møgulig framtíðar samstarvsøkir* ........ 43

# § 1. Avtalupartar

**Sjúkrahúsverk Føroya**

Umboðað av:
Landssjúkrahúsið (LS) og Klaksvíkar Sjúkrahús (KS)
og
**Almannaverkið (AV)**
og
**kommunalu samstarvsøkini innan eldraøkið (KSØ)**
t.e.:
Norðoya Bú- og Heimatænasta
Heimatænastan í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu
Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum
VEKS
Heimatænastan í Vágum
Økistænastan í Sandoyar Sýslu
Bú- og Heimatænastan í Suðuroy
umframt
**Heilsu- og umsorganartænastan**
Tórshavnar kommuna (TK)

# § 2. Endamál

Endamálið við hesi avtaluni er at betra um samlaðu sjúklinga/borgara- gongdina við einum skipaðum tvørsektorsamstarvi millum LS, KS, AV, tey 7 kommunalu samstarvsøkini innan eldraøkið (KSØ), umframt Tórshavnar kommunu (TK) við greiðum ásetingum viðvíkjandi innihaldi og mannagongdum. Harútyvir kunnu partarnir gera sínámillum tvípartaavtalur har tað er hóskandi og neyðugt.

# § 3. Allýsingar

Heimatænasta: Tænasta[1], sum fevnir um:

1) Heimahjálp: Heimahjálp verður veitt borgarum, sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt ella stuðli.
2) Heimasjúkrarøkt: Sjúkrarøkt, íð er veitt borgara í egnum heimi ella á eldrabústovni, fevnir um sjúkufyribyrging, sjúkrarøkt, endurmenning, uppsøkjandi arbeiði og almenna heilsuvegleiðing.

Í hesi avtalu verður orðið Heimatænasta brúkt bæði í eintali og fleirtali.

# § 4. Skipan av tænastunum og samstarvinum

LS, KS, AV, KSØ/TK skulu tryggja hvør sær, at starvsfólk, ið fáast við at veita tænastur til hin partin, hava neyðugu útbúgvingarnar/førleikarnar, eru skikkað og regluliga fáa dagført sína vitan til tess at kunna veita tænastur á einum nøktandi støði.

# § 5. Samstarvsøki

Í fylgiskjali 1-10 eru fyri ymisku samstarvsøkini serstakar ásetingar, herundir treytir, mannagongdir og annað viðkomandi.

[1] § 9 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt vm.

## § 6. Stýribólkur

Umboð fyri samstarvspartarnar møtast í minsta lagi 1 ferð um árið til at gera støðuna upp viðvíkjandi samstarvinum og meta um tørv á dagføringum av avtaluni og tilhoyrandi fylgiskjølum. Fundir verða avtalaðir á hvørjum fundi fyri komandi árið. Um tørvur er á tí, kann hvør partur biðja um at fáa fund við 21 daga varningi. Fundirnir eru triðjuhvørja ferð á LS/KS, á AV ella hjá Kommunufelagnum, um ikki annað er avtalað. Hvør parturin avger sjálvur, hvussu nógv fólk møta vegna partin, herundir hvørji fólk frá fyrisiting, kliniskum deildum v.m.

## § 7. Fundarinnkalling

Innkallandi parturin sendir uppskot til fundarskrá í minsta lagi 21 dagar áðrenn fundin.
Stk. 2. Við fundarinnkallingini skal fylgja ein dagsskrá, sum so vítt møguligt skal tilskila, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum, og hjálagt skal vera tað tilfar, sum er neyðugt til tess at viðgera málini.
Stk 3. Føst punkt á dagsskránni fyri fundir í nevndini eru hesi:

1) Gjøgnumgongd av seinastu fundarfrásøgn.
2) Partarnir kunna um týðandi viðurskifti og hendingar í sambandi við samstarvið og avtaluna.
3) Uppskot til evnir. Báðir partar kunnu koma við málum, sum skulu viðgerast.

## § 8. Fundarfrásøgn

Eftir hvønn fund ger tann parturin, har fundurin hevur verið, fundarfrásøgn, har tilskilað verður:

1) Hvørji vóru við til fundin.
2) Innihaldið á fundinum í høvuðsheitum og avgerðir/semjur í teimum einstøku málunum.

Stk 2. Fundarfrásøgnin skal vera tøk í seinasta lagi 7 dagar eftir fundin. Broytingar og rættingar til fundarfrásøgnina verða í seinasta lagi viðgjørdar á næsta fundi og førdar inn í næstu fundarfrásøgn, um tær ikki eru rættaðar áðrenn.

## § 9. Skoðan

Partarnir skulu hava eitt vakið eyga við, at mannagongdir í avtaluni verða fylgdar, og um tørvur er á tillagingum v.m.

## § 10. Tíðarskeið og uppsøgn

Henda avtala er galdandi frá 3. mars 2015 til og við 31. desember 2015. Partarnir kunnu hvør sær uppsiga avtaluna sum heild ella einstøk fylgiskjøl við eini freist uppá 6 mánaðir, um ikki annað verður avtalað í semju millum partarnar.

## § 11. Rættindaviðurskifti

Um ikki annað er avtalað í serligari avtalu fær hvørgin parturin ella starvsfólk tess, við tænastunum tey veita sbrt. hesari avtaluni, upphavsrættindi, patentrættindi ella onnur hugmyndalig rættindi ella rætt til møguligar uppfinningar, uppdagingar ella krav uppá at verða partur av vísindagreinum ella líknandi møguligum úrslitum av granskingarverkætlanunum.

## § 12. Tagnarskylda og víðarilating av upplýsingum

Víst verður til galdandi reglur fyri virksemi í Almannaverkinum, virksemið á tí kommunala økinum og tað almenna heilsuverkið, herundir í sjúkrahúslógini,

persónsupplýsingalógini, fyristingarlógini, lóg um patienters retsstilling, lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

## § 13. Force majeure
Hvørgin parturin kann ábyrgdast fyri ikki at uppfylla avtaluna til tíðina, tá atvoldin er eitt hvørt, sum partarnir ikki hava nakra ávirkan á, eitt nú, men ikki avmarkað til, ódnarveður, vatnflóð, eldsbruni, kríggj, verkfall ella verkbann.

## § 14. Kontaktpersónar
Samskiftispersónar viðvíkjandi hesari rammuavtaluni er ásett í fylgiskjali. Fyri einstøk fylgiskjøl kann verða ásett nærri um aðrar samskiftispersónar.

## § 15. Fráboðanir millum partarnar
Fráboðanir millum partarnar viðvíkjandi týðandi yvirornaðum avtaluviðurskiftum eftir hesum sáttmála skulu verða staðfestar við skrivligum samskifti pr. t-post, har avsendarin biður um váttan fyri móttøku. Fráboðanir og samskifti annars fylgir ásetingum í fylgiskjølunum ella sum annars leypandi verður avtalað.

## § 16. Ábyrgd- og ábyrgdarfráskriving
Hvør sáttmálapartur ber ábyrgd av egnum starvsfólki viðv. trygging o.s.fr.

## § 17. Undirskriving og heildin av sáttmálanum
Hesin sáttmáli verður undirskrivaður í 4 eintøkum, eitt til hvønn partin. Sáttmálin við tilhoyrandi fylgiskjølum lýsir treytirnar, ið eru avtalaðar millum partarnar og skulu møgulig ískoyti til sáttmálan verða dagfest og undirskrivað í 4 eintøkum, eitt eintak til hvønn partin.

**Almannaverkið** Dato 03.03.2015

**Landssjúkrahúsið** Dato 03.03.2015

**Klaksvíkar Sjúkrahús** Dato 03.03.2015

**Norðoya Bú- og Heimatænasta** Dato 03.03.2015

**Heimatænastan í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu** Dato 03.03.2015

**Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum** Dato 09.03.2015

**VEKS** Dato 03-03.2015

Heimatænastan í Vágum Dato 13/3 - 2015

Økistænastan í Sandoyar Sýslu Dato 3/3-15

Bú- og Heimatænastan í Suðuroy Dato 6/3-15

Heilsu- og umsorganartænastan
Tórshavnar kommuna (TK) Dato 03.03.2015

# Fylgiskjal 1 - Útskrivingarmannagongdir somatikk, psykiatri og uttanlandsøkið

## a) Útskrivingarmannagongd somatikk – vanlig

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Evni.: | Útskriving av sjúklingum | Endamál: | At tryggja borgarum ið tørva hjálp frá KSØ/TK og AV, samanhang í tænastuni í samband við sjúkrahúsinnlegging og útskriving. |
| | Gjørt: | M á F og MT, (AV)<br>GR og J í G, (LS) | Góðkent: | AV(HT/ÁD) LS (NT/IG) |
| | Dato: | 16. desember 2014 | Endurskoðast: | September 2015 |

| | |
|---|---|
| Evni:<br><br>**Útskrivingar-mannagongd** | **Útskriving av sjúklingum:**<br>1. Stuttar innleggingar (1- 3 dagar)<br>2. Miðal langar innleggingar (1 – 2 vikur)<br>3. Borgarar, ið eru í skipanini hjá AV ella KSØ/TK við:<br>a) bert tørvi á heimasjúkrarøkt, sí punkt 1<br>b) sama tørvi, sum undan innlegging, sí punkt 2<br>c) øktum tørvi, sí punkt 3<br>4. Nýggir borgarar við tørvi fyri fyribils ella varandi hjálp, sí punkt 4.<br>5. Broytt sosial- fíggjar og arbeiðsstøða, sí punkt 5.<br>6. Útskriving eftir longri varandi innlegging og við serligum og samansettum tørvi, (*sí* b) Útskrivingarmannagongd somatikk - samansettan (kompleksan tørv), sí punkt 11.<br><br>*Tað er umráðandi at útskrivingartilgongin byrjar beinanvegin, tá sjúklingurin verður innlagdur.* |
| **Boð um útskriving** | Boð um útskriving verður móttikið mánadag - hósdag millum **kl. 10 -15** og fríggjadag millum **kl. 10-12** til: |

| | Tlf | Vakttlf. | Faks.nr | T-postur |
|---|---|---|---|---|
| Almannaverkið | 360000 | | 360001 | |
| Norðoya Bú- og Heimatænasta: | | | | |
| - Heimatænastan | 793400 | | 456269 | ht@nbh.fo |
| - Sambýlið á Heygunum | 458483 | | 458183 | sah@nbh.fo |
| - Sambýlið í Bøgøtu | 457343 | | 457443 | sib@nbh.fo |
| - Norðoya Ellis- & røktarheim | 456775 | | 457924 | nev@nbh.fo |
| - Heimið við Vágna | 408400 | | 408409 | hvv@nbh.fo |
| - Norðoya Røktarheim | 457610 | | 457465 | nr@nbh.fo |
| - Búðatrøð, dagtilhald | 223008 | | | annikav@nbh.fo |
| - Ven & virka | 793408 | | | vv@nbh.fo |
| Heimatænastan í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu: | | 730210 | 730211 | heimatanastan@eystur.fo |
| - Vesturstova (Fuglafj.) | 730230 | | 730231 | vesturstova@eystur.fo |
| - Gøtubrá (Norða Gøta) | 730250 | | 730251 | gotubra@eystur.fo |
| - Giljagarður (Leirvík) | 730280 | | 730281 | giljagardur@eystur.fo |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum<br>- heimasjúkrafrøðingurin | 793300 | 793379 | 44 93 49<br>449507 | sam@sam.fo |
| VEKS NORÐ: Sunda Eiði<br>VESTUR: Vestmanna Kvívik<br>Sí tel og fax á www.veks.fo | 471050<br>424525 | 793273<br>793274 | 471051<br>424395 | veks@veks.fo |
| Heimatænastan í Vágum<br>- heimasjúkrafrøðingurin | 793200 | 793271 | 353651<br>333992 | htv@htv.fo |
| Økistænastan í Sandoyar Sýslu | 793600 | 793670 | 361891 | ot@ot.fo |
| Bú- og Heimatænastan í Suðuroy | 793500 | | 373908 | oki5@bhs.fo |
| Heilsu- og umsorganartænastan/ Tórshavnar kommuna (TK) | 302000 | 793199 | 317145 | heilsuhusid@torshavn.fo |

So skjótt sum til ber boðar sjúkrahúsið ávísa øki hjá Heimatænastuni frá, nær sjúklingurin verður útskrivaður (sí tlf. lista 1).
Er talan um borgara búsitandi á búplássi í Trivnaðardeplinum, verður avvarðandi eindarleiðari/bústaður fráboðaður (Sí tlf. lista 2).
Røktar- og venjingarfrágreiðing við heilivágslista frá sjúkrahúsinum skal sendast til avvarðandi faks nr. (sí tlf. lista 1).
Tá borgari, ið er í skipanini hjá KSØ/TK ella AV, verður innlagdur á sjúkrahúsið, skal frágreiðing um borgaran frá AV ella KSØ/TK fylgja við ella sendast sjúkrahúsinum skjótast gjørligt (***sí appendix A***).
KSØ/TK kunnu eisini brúka egnu innleggingarskjøl og heilvágslistar við identiskum upplýsingum.

| | |
|---|---|
| **Punkt 1. Bert heimasjúkrarøkt** | 1. Um tørvur er á tænastu bert frá heimasjúkrarøktarfrøðingi, kann tænastan veitast dagin eftir áheitan, um talan er um einstakar viðgerðartænastur. Sjúklingurin skal kunnast um møguleikan fyri at koma í klinikk hjá Heimatænastuni og skal hesin møguleiki brúkast mest møguligt. Sjúkrahúsið søkir Heilsutrygd um sárrøktartilfar til viðgerð sum tað hevur sett í verk og tá roknað verður við at viðgerðir varðar longri enn 1 mánað. Sárrøktartilfar skal sendast heim við til 1 mánað. Við áheitan um heimasjúkrarøkt, skal navn á borgara, bústaður, deild og navn á starvsfólki, ið ringir, uppgevast. Um neyðugt er at ringja aftur fyri at fáa fleiri informatiónir, ringir heimasjúkrarøktarfrøðingur aftur sama dag. |
| **Punkt 2. Sama tørv** | 2. Er talan um heimahjálp til kendar borgarar, við sama tørvi sum áðrenn innleggjan, skal boðast frá dagin fyri útskriving áðrenn kl. 14 og fríggjadag kl. 12. |
| **Punkt 3. Øktur tørvur** | 3. Er talan um øktan tørv á heimahjálp, er neyðugt at fáa boðini minst 2 yrkadagar fyrrapartin áðrenn útskriving, har greitt verður frá tørvinum, og avgerð verður tikin um hjálpin verður sett inn beinanvegin, ella nýggj áheitan til visitatión er neyðug. |
| **Punkt 4. Nýggjur borgari** | 4. Tá talan er um nýggjan borgara við tørv á heimahjálp, er neyðugt við áheitan til visitatión. Í áheitanini verður eisini skrásett um tørvur er á heimasjúkrarøktarfrøðingi og/ ella terapeuti. Um talan er um nýggjan borgara, har tørvur er fyri heimahjálp eitt ávíst tíðarskeið, har tørvur ikki er á hjálpitólum ella broyting av bústaði, er neyðugt at fáa boðini minst 2 yrkadagar áðrenn útskriving. |

| | |
|---|---|
| **Punkt 5.**<br>**Árin á sosial-fíggjar og arbeiðsføri** | 5. Í samband við útskriving skal metast um sjúklingurin hevur havt árin á sosial- ella fíggjarstøðuna ella varandi árin á arbeiðsføri, og er tá neyðugt at boða frá til AV. Hetta eigur at verða jørt í samráð við sjúklingin. Víst verður til fráboðanarskylduna í forsorgarlógini § 38, stk. 1. |
| **Punkt 6.**<br>**Innlegging á kvøld/nátt** | 6. Sjúklingar, sum verða innlagdir seint á degi, um kvøldið/náttina, har skal sjúkrahúsið boða KSØ/TK frá á vakt tlf. (sí tlf. lista 1). Um talan er um borgara búsitandi í Trivnaðardeplinum hjá AV, verður bústaðurin fráboður. Sjúkrahúsið skal viðmerkja, um sjúklingurin verður útskrivaður dagin eftir, ella um sjúklingurin verður liggjandi nakrar dagar. |
| **Punkt 7.**<br>**Heilivágur** | 7. Neyðugt er at senda heilivág heim við til 3 dagar og er tað til vikuskifti ella høgtíð, so er neyðugt at dosera til og við 3 gerandisdagar eftir vikuskifti ella høgtíð. Um borgarin er av bygd, so skal Apotekið fáa boð um at senda heilivágin til bygdina. Um borgarin er í skamtluting og broyting er í heiliváginum, skal sjúkrahúsið siga Apotekinum frá. |
| **Punkt 8.**<br>**Hjálpitól** | 8. Er talan um fyribils tørv, letur sjúkrahúsið hjálpartólini og er lánitíðin vanliga at rokna 3 mánaðir. Er talan um varandi tørv, søkir sjúkrahúsið frá Viðskiftadeplinum hjá AV. Sjúklingadeildin bíleggur sengur og fysioterapiin/ergoterapiin bíleggur annað og tryggjar sær at tólini eru komin heim. |
| **Punkt 9.**<br>**Útskriving til pláss á** eldrabústovni | 9. Um sjúklingurin ikki er egnaður at útskriva til egið heim, skulu sjúkrahúsini tryggja, at umsókn um eldrabúpláss til sjúklingin verður latin viðkomandi KSØ/TK. Umsóknir fáast til vega við at venda sær til avvarðandi skrivstovu (sí tlf. lista 1). Hetta vil tó í fáum førum vera viðkomandi í mun til styttri og miðal langar innleggingar. |
| **Punkt 10.**<br>**Útskriving til** eldrabústovn ella umlætting | 10. Aftaná liðug viðgerð av sjúklingi búgvandi á eldrabústovni ella sum er til umlætting, skal boðast frá dagin fyri útskriving (boðast frá áðrenn kl. 14). |
| **Punkt 10.**<br>**Serligur og samansettur tørvur** | 11. Til útskriving eftir longri varandi innlegging við serligum og samansettum tørvi, er serstøk útskrivingar mannagongd gjørd til endamálið (sí b) Útskrivingarmannagongd somatikk - samansettan (kompleksan tørv). |

## b) Útskrivingarmannagongd somatikk - samansettan (kompleksan tørv)

Útskrivingargongdin hjá sjúklingum, sum hava nýkomnan, broyttan ella øktan tørv á tænastum frá kommunalum samstarvsøkjum (KSØ) ella Tórshavnar Kommunu (TK) ella Almannaverkinum aftaná útskriving (somatiska økið – samansettan/kompleksan tørv).

| | |
|---|---|
| **Pkt. 1. Innleggilsi** | Sjúklingur innlagdur. |
| **Pkt. 2. Fá heimildir til vega** | Sjúkrarøktarfrøðingur fær heimild frá sjúklingi ella avvarðandi til at lata og heinta upplýsingar millum stovnar. |
| **Pkt. 3. Viðgerðarætlan** | Lækni, sjúkrarøktarfrøðingur, fysio- og ergoterapeutur hjá LS/KS gera viðgerðarætlan, og fáa samband við Heimatænastuna ella viðkomandi tænastur í AV eftir tørvi, skjótast gjørligt aftaná innlegging. |
| **Pkt. 4. Heimavitjan** | Ergo-/fysioterapeutar á LS/KS, og menningarterapeutur í AV ella starvsfólk hjá KSØ/TK fer á heimavitjan fyri at greina tørvin í egnum heimi, og søkja Viðskiftadepilin um hjálpartól, persónligan stuðul e.l. |
| **Pkt. 5. Fráboðan** | Sjúkrarøktarfrøðingur setir seg í samband við KSØ/TK ella AV um útskrivingina í minsta lagi 14 dagar áðrenn. |
| **Pkt. 6. Útskriving** | Útskriving. |

**Endamál**
At útskrivingargongdin verður fyrireikað skjótt aftaná innlegging, soleiðis at sjúklingurin sleppur undan óneyðugum eyka innleggingardøgum.
Við eini útskrivingarmannagongd tryggja vit tvørfakligt samstarv við KSØ/TK, AV og LS/KS og eina smidliga útskriving.
Uppgávubýtið millum fakbólkarnar er greinað.
Mannagongdin eigur at verða nýtt sum arbeiðsamboð til niðanfyrinevnda málbólk.
Hetta er mannagongd, sum eigur at vera partur av innleiðsluni av nýsettum starvsfólkum á LS/KS.
Starvsfólk eiga at verða undirvíst í at nýta ADL- Taxonomi vegleiðing. At fylgja mannagongdini hevur stóra týdning.

Málbólkur:
Sjúklingar sum eftir sjúku hava nýkomnan, broyttan ella øktan tørv á heimatænastu, hjálpartólum, húsabroytingum, endurmenning til arbeiðslívið ella endurmenning í mun til gerandisdagin eftir útskriving.

Tvørfakligar samrøður við sjúkling og avvarðandi:
Umráðandi er, at sjúklingur hevur játtað, at kunning verður latin millum stovnarnar.
Sjúkrarøktarfrøðingur skipar fyri, at viðkomandi persónar fáa boð um at koma til samrøðu, og umboð verða vald til at fara á fund.
Toymið hittist frammanundan fyri at tryggja eintýðuga kunning. Avtalað verður, hvør er fundarstjóri og hvør er skrivari. Arbeitt verður útfrá frágreiðing (sí skjal III).
Uppgávan hjá skrivaranum er at fylla út skjal I. II og III, og leggja tað í røktarætlan hjá sjúklinginum.
Um tørvur er á tí, kann skipast fyri samrøðu við lækna, har hann kunnar um støðu hjá sjúklingi, kanningar, úrslit av hesum, heilivág o.a.

Borgarar í arbeiðsførum aldri:
Er talan um yngri borgara í arbeiðsførum aldri, og sjúkutilburðurin hevur árin á sosialu og / ella fíggjarligur støðuna, ella varandi árin á arbeiðsførleikan, skal Viðskiftadepilin í AV fráboðast skjótast gjørligt eftir innlegging.

1. Viðskiftadepilin, tilnevnir borgaranum ein samskipara, og fráboðar KSØ/TK, at borgari kemur í teirra skipan.
2. Viðskiftadepilin fráboðar LS/KS, hvør samskiparin er.
3. LS/KS kallar samskiparan í KSØ/TK ella AV inn til allar fundir í samband við útskrivingina.

Allir borgarar: Familjusamrøða, seinast 2 vikur eftir innleggjan:
**Endamál:**

- ✓ At kunna sjúkling og avvarðandi um, hvussu arbeitt verður á deildini, um m.a. hvør hevur ábyrgd fyri hvørjum, og at starvsfólk verða kunnað um nærumhvørvi hjá sjúklinginum.
- ✓ Fundurin skal verða seinast 2 vikur aftan á innlegging.
- ✓ Sjúklingur og avvarðandi greiða frá støðu áðrenn innlegging. Um familjuviðurskifti, sosialar umstøður og arbeiði / frítíðarítriv.
- ✓ Toymið – fx ergoterapi, fysioterapi, røkt, logopædi, sálarfrøðingur, sosialráðgevi – greiðir frá, hvussu viðgerðin er ætlað at fara fram
- ✓ Tosað verður um bústaðarviðurskifti, og møgulig umsókn til bústovn, við atliti til útskriving. Heimavitjan verður planløgd.
- ✓ Kunnað verður um, at sjúklingurin kann koma heim um vikuskiftið.

Familjusamrøða miðskeiðis samrøða:
**Endamál:**

- ✓ Um tørvur er, kann tað verða týðandi at hava eina miðskeiðis samrøðu, har mál verða gjøgnumgingin, og møguligar broytingar viðgjørdar.
- ✓ Útgangsstøðið verður tikið úr skjali I, II og III, sum áður er skrivað, og skjal III verður dagførd.
- ✓ Toymið er á fundi. AV samskipari, KSØ/TK visitator.
- ✓ Her verður eisini lagt til rættis s.s skamtan, dagtilboð, døgurði frá øðrum, kallitól o.a.

Familju samrøða útskrivingar samrøða:
**Endamál**: At tryggja, at útskrivingin er fyrireikað soleiðis, at allir partar eru til klárir.

- ✓ Fundurin skal vera seinast 1 viku áðrenn útskrivan.
- ✓ Toymið hittist áðrenn - fyri at tryggja eintýðuga kunning. Avtalað verður, hvør er fundarstjóri-, og hvør er skrivari. Uppgávan hjá skrivaranum er at dagføra skjal I, II og III og senda avrit til KSØ/TK. Umráðandi er, at visitator frá hjá KSØ/TK og/ella samskipari frá AV, er við. Arbeitt verður útfrá hjálagda skjali II.
- ✓ Stutt kunning verður givin um innleggingartíðina, um málini eru nádd, um ætlanir og møguliga eftirviðgerð.
- ✓ Útskrivingardagur verður avtalaður, flutningur, hvør er heima, tá sjúklingurin kemur heim.
- ✓ Sjúkrarøktarfrøðingur tryggjar at røktarætlan, medicinkort og ambulantar tíðir eru dagførdar.

| Mannagongd- frá innlegging til útskriving | | | |
|---|---|---|---|
| Evni | Tiltøk | Ábyrgd | Sign og dato |
| Er talan um borgara, sum fær heimatænastu, verður KSØ/TK kunnað um, at sjúklingur er innlagdur á LS/KS.<br><br>Er talan um borgara í arbeiðsførum aldri, sum mett verður fer at hava tørv á tænastu/veiting frá Almannaverkinum eftir innlegging vegna broytta støðu. | Ringja til Heimatænastuna hjá KSØ/TK í økinum hjá sjúklinginum. Fáa hendur á samstarvsbók, fáa umráðandi kunning.<br><br>Fráboða Viðskiftadeplinum á AV. | Sjúkrarøktarfrøðingur, sum er um sjúklingin dag 1 ella 2 og avvarðandi | |
| Ergo/ fysioterapi verður ordinerað, tá sjúklingurin verður móttikin | Lækni ordinerar ergo og/ ella fysioterapi í journalina. | Lækni, sum tekur ímóti sjúklinginum | |
| Játtan frá sjúklingi ella avvarðandi | Sjúkrarrøktarfrøðingur fær loyvi frá sjúklingi ella avvarðandi at lata upplýsingar millum stovnar.<br>Gerast starvsfólk varug við, at borgari býr og livir undir ónøktandi viðurskiftum, hevur Landssjúkrahúsið fráboðanarskyldu til AV, vísandi til § 38 í Forsorgarlógini, og Kunngerð nr. 37 frá 22 mars 1993 um fráboðanarskyldu sambært forsorgarlógini. Sum dømi kann nevnast borgari, sum ikki hevur sjúkuinnlit, heimleys og ófullfør. | Sjúkrarøktarfrøðingur, sum tekur ímóti sjúklinginum. | |
| Um ivamál er viðvíkjandi heilivági, viðgerð røkt, skamtan o.s.v. | Lækni setir seg í samband við kommunulækna og/ ella sjúkrarøktarfrøðingur setir seg í samband við Heimatænastuna hjá KSØ/TK. | Sjúkrarøktarfrøðingur | |
| Ergo/ fysioterapeutar meta um tørvin á hjálpartólum og heimavitjan hjá KSØ/TK | Ergo/fys. hjálpir sjúklinginum at søkja um hjálpartól, og setur seg í samband við økisterapeutirn og Viðskiftadepilin hjá Almannaverkinum. Heimavitjunar rapport verður send Heimatænastuni hjá KSØ/TK og Viðskiftadeplinum. | Kontakt terapeutur | |
| Heimatænastan hjá KSØ/TK og/ella AV verður kontaktað beinanvegin útskrivingin er planløgd. | Ringja til Heimatænastuna hjá KSØ/TK og/ella AV, kunna um sjúklingin út frá skrivi frá Heimatænastuni. | Sjúkrarøktarfrøðingur | |
| Samstarvsbók fylgir við sjúkling frá LS/KS, hava tey eina slíka | Útfylla skjal I, II og III<br>Faxast til Heimatænastuna hjá KSØ/TK aftaná útskrivingarsamrøðuna.<br>Við deyða má bókin retur til Heimatænastuna | Sjúkrarøktarfrøðingur ergoterapeutur, fysioterapeutur, evt aðrir fakbólkar | |
| Hjálpartól | Tryggja, at hjálpartólini eru fingin til vega, herundir húsabroytingar. | Kontakt terapeutur | |

| Samrøður | | | |
|---|---|---|---|
| Evni | Tiltøk | Ábyrgd | Sign og dato |
| Familjusamrøða | Kalla inn til samrøðu<br>sí endamál við samrøðu<br>GG: er talan um borgara í arbeiðsførum aldri er umráðandi at samskiparin í Viðskiftadeplinum í AV og KSØ/TK er við til samrøðuna | Sjúkrar øktarfr øðingur | |
| Miðskeiðissamrøða | Kalla inn til samrøðu<br>sí endamál við samrøðu<br>GG: er talan um borgara í arbeiðsførum aldri er umráðandi at samskiparin í Viðskiftadeplinum í AV og KSØ/TK er við til samrøðuna | Sjúkrar øktarfr øðingur | |
| Útskrivingarsamrøða | Kalla inn til samrøðu<br>sí endamál við samrøðu<br>GG: er talan um borgara í arbeiðsførum aldri er umráðandi at samskiparin í Viðskiftadeplinum í AV og KSØ/TK er við til samrøðuna | Sjúkrar øktarfr øðingur | |

# ADL TAXONOMI



<table>
<tr><th colspan="3">Tvørfaklig niðurstøða</th></tr>
<tr><td rowspan="2">1</td><td rowspan="2">Navn:<br>P-tal:<br>Innlagdur, dato:<br>Bústaður:<br>Tlf.nr.:<br>Egin lækni:</td><td>Heimatænastan:</td></tr>
<tr><td>Avvarðandi<br>Bústaður:<br>Tlf.nr.:</td></tr>
<tr><td>2</td><td colspan="2">Yrki:<br><br>Familjuviðurskifti:<br>Kenningar:<br>Bústaðarviðurskifti:</td></tr>
<tr><td>3</td><td colspan="2">Stutt lýsing av fysisku støðuni:<br><br>Serlig fysisk viðurskifti:<br><br>Flytingar/rørsla:<br><br>Leguháttur:</td></tr>
<tr><td>4</td><td colspan="2">Samskifti:<br><br>Talupædagogur:</td></tr>
<tr><td>5</td><td colspan="2">Kognitiv styrki og trupulleikar:<br><br>Persónligheit, kenslulig og sosial funktión:<br><br>Psykolog:</td></tr>
<tr><td>6</td><td colspan="2">Samdøgursrytma/broytingar:</td></tr>
<tr><td>7</td><td colspan="2">Persónligt reinføri:</td></tr>
<tr><td>8</td><td colspan="2">At fara á vesi:</td></tr>
<tr><td>9</td><td colspan="2">At lata seg í:</td></tr>
<tr><td>10</td><td colspan="2">Føðsla/etistøða:</td></tr>
<tr><td>11</td><td colspan="2">At arbeiða í køki:</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| 12 | **Reingerðing:**<br>**At vaska klæðir:** |
| 13 | **Flutningur:**<br><br>**At keypa:** |
| 14 | **Hjálpartól:** |
| 15 | **Áhugamál:**<br><br>**Týdningarmiklar dagligar uppgávur:** |
| 16 | **Venjing og virkni meðan innlagdur:** |
| 17 | **Sjúkuavgerð/Sjúkugongd:** |
| 18 | **Sjúklingsins metan av egnari støðu:** |
| 19 | **Frágreiðing til sjúkling/avvarðandi:** |
| 20 | **Aktuel sjúkrarøkt:** |
| 21 | **Meting:** |

| | |
|---|---|
| | |
| 22 | **Rehabiliteringsætlan:** |

| Heilivágur | kl. | kl. | kl. | kl. | kl. | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |

| | |
|---|---|
| Innspræningar | |
| Amb.tíðir | |
| Blóðroyndir: | |
| Urinroyndir: | |

**Stað og dato:**

**Sent til :**

Heimatænastan spyr hesar spurningar via tlf., í samband við útskrivan

| | |
|---|---|
| Borgari: | P-tal: |
| Bústaður: | Sosiala støðan: |
| Tlf.: | Avp. Fp. Annað: |
| Lækni: | Gjaldandi brúkari: |
| Kendur brúkari ókendur | (kostnaður sbrt. kunngerð) |
| Hvør ringir: | Móttikið hevur: |
| Deild: | Dato: |
| Avvarðandi: | Avvarðandi |
| Fam.: | Fam.: |
| Bústaður: | Bústaður: |
| Tlf.: | Tlf.: |

Diagnosa/Sjúkrasøga:

Heilivágur- skamtan ella ei:

Viðgerð/Sjúkrarøkt:

Persónlig røkt:

Hjálp til máltíð:

Rørsla:

Umstøðan annars, sosialt/mentalt:

| | |
|---|---|
| Tørvur á heimarøkt: | Tørvur á sjúkrarøkt: |
| Heimavitjan: hin/kl.: | Revisitering: |
| Avtalur/Kontrol: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Norðoya Bú- og Heimatænasta:<br>- Heimatænastan<br>- Sambýlið á Heygunum<br>- Sambýlið í Bøgøtu<br>- Norðoya Ellis- & røktarheim<br>- Heimið við Vágna<br>- Norðoya Røktarheim<br>- Búðatrøð, dagtilhald<br>- Ven & virka | <br>793400<br>458483<br>457343<br>456775<br>408400<br>457610<br>223008<br>793408 | | <br>456269<br>458183<br>457443<br>457924<br>408409<br>457465 | <br>ht@nbh.fo<br>sah@nbh.fo<br>sib@nbh.fo<br>nev@nbh.fo<br>hvv@nbh.fo<br>nr@nbh.fo<br>annikav@nbh.fo<br>vv@nbh.fo |
| Heimatænastan í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu:<br>- Vesturstova (Fuglafj.)<br>- Gøtubrá (Norða Gøta)<br>- Giljagarður (Leirvík) | <br><br><br>730230<br>730250<br>730280 | 730210 | 730211<br><br><br>730231<br>730251<br>730281 | heimatanastan@eystur.fo<br><br><br>vesturstova@eystur.fo<br>gotubra@eystur.fo<br>giljagardur@eystur.fo |
| Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum<br>- heimasjúkrafrøðingurin | 793300 | 793379 | 44 93 49<br><br>449507 | sam@sam.fo |
| VEKS NORÐ: Sunda Eiði<br>VESTUR: Vestmanna Kvívik<br>Sí tel og fax á www.veks.fo | 471050<br>424525 | 793273<br>793274 | 471051<br>424395 | veks@veks.fo |
| Heimatænastan í Vágum<br>- heimasjúkrafrøðingurin | 793200 | 793271 | 353651<br>333992 | htv@htv.fo |
| Økistænastan í Sandoyar Sýslu | 793600 | 793670 | 361891 | ot@ot.fo |
| Bú- og Heimatænastan í Suðuroy | 793500 | | 373908 | oki5@bhs.fo |
| Heilsu- og umsorganartænastan/ Tórshavnar kommuna (TK) | 302000 | 793199 | 317145 | heilsuhusid@torshavn.fo |

## c) Útskrivingarmannagongd millum LS/Psykiatriska Depilin og AV ella KSØ/TK

**Endamál**
At tryggja borgarum, ið tørva hjálp frá AV ella KSØ/TK, samanhang í tænastuni í samband við sjúkrahúsinnlegging og -útskriving.

At útskrivingargongdin verður fyrireikað skjótt aftaná innlegging, soleiðis at sjúklingurin sleppur undan óneyðugum eyka innleggingardøgum.

At uppgávubýtið millum fakbólkarnar og tænastuveitarar er greinað.

At borgarin fær eina samanhangandi viðgerð frá sekundærsektori til primærsektor. Samstundis tryggja, at borgarin fær ta tænastu, ið AV hevur at bjóða, fyri at stimbra rehabilitering og recovery-gongdina.

Fyribyrgja, at somu kanningar verða gjørdar tvær ferðir, t.d. at ergoterapeutur á Psykiatriska Deplinum og ergoterapeutur í AV ella KSØ/TK gera somu kanning hvør sær.

At tryggja, at báðir sektorar geva borgara somu boð, og harvið fyribyrgja ótryggleika og neiliga ávirkan á recovery-gongdina.

Við eini útskrivingarmannagongd tryggja vit tvørfakligt samstarv millum AV, KSØ/TK og Psykiatriska Depilin, og samstundis tryggja vit eina smidliga útskrivan.

Hetta er mannagongd, sum eigur at vera partur av innleiðsluni av nýsettum starvsfólkum á LS. At fylgja mannagongdini hevur stóran týdning. Mannagongdin eigur at verða nýtt sum arbeiðsamboð til niðanfyrinevnda málbólk.

**Málbólkur**
Borgarar, sum eftir innleggjan á Psykiatriska Deplinum hava tørv á tænastum, ið AV ella KSØ/TK veitir.

Tænastur og veitingar frá AV
- Persónlig ráðgeving.
- Fíggjarligur stuðul – sjúkradagpeningur, uppihaldshjálp, fyritíðarpensjón, stuðul til gjald av stak- og sjúkraútreiðslum, hjálparráð.
- Endurmenning í mun til arbeiðsmarknaðin.
- Endurmenning í mun til gerandisdagin.
- Persónligur stuðul, vardur bústaður, arbeiðstilboð, umlætting.

Tænastur og veitingar frá KSØ/TK
- Umlætting, heimahjálp, heimarøkt

Tá talan er um borgara, sum ikki hevur samband við AV ella KSØ/TK áðrenn innlegging, skal LS/KS venda sær til AV Viðskiftadepilin, sum finnur fram til rætta ráðgevan.
Viðskiftadepilin, tlf. 36 00 00, mánadag–hósdag kl. 10-15, fríggjadag kl. 10-13.
Viðvíkjandi KSØ/TK verður kontaktað sambært lista.

**Gongdin frá innlegging til útskriving**
1. Sjúklingurin verður innlagdur á psykiatriska seingjardeild.
2. Við váttan um samtykki fær sjúkrarøktarfrøðingur/heilsurøktari heimild frá sjúklingi ella avvarðandi til at lata og heinta upplýsingar millum stovnar.

3. Lækni og sjúkrarøktarfrøðingur/heilsurøktari (toymi) gera viðgerðarætlan. Um tað verður mett, at borgarin møguliga hevur tørv ella broyttan tørv á tænastum frá AV ella KSØ/TK eftir útskrivan, skal AV ella KSØ/TK skjótast gjørligt inndragast í borgaragongdina. Hetta við at kontakta Viðskiftadeplin ella KSØ/TK.
Gerst Psykiatriski Depilin varugur við, at borgari býr og livir undir ónøktandi viðurskiftum, hevur Landssjúkrahúsið fráboðanarskyldu til AV, vísandi til § 38 í Forsorgarlógini og Kunngerð nr. 37 frá 22. mars 1993 um fráboðanarskyldu sambært forsorgarlógini. Sum dømi kann nevnast borgari, sum ikki hevur sjúkuinnlit.
4. Um tað undir innleggjan verður hugsað av fakfólki, at ein heimavitjan er viðkomandi, er umráðandi skjótast gjørligt at bjóða AV og KSØ/TK á fund viðvíkjandi hesum. Soleiðis, at man kann snikka eina "realistiska" tænastu til borgaran eftir útskrivan.
5. Sjúkrarøktarfrøðingur setir seg í samband við AV um útskrivingina so skjótt tað verður hugsað útskriving. Fundur skal vera seinast 3 dagar áðrenn útskriving.
6. Útskriving.

**Sjúklinga-, avvarðandi- og útskrivingarsamrøða**
**Endamál**: At tryggja at øll kunning, ið viðkemur rehabilitering og recoverygongdini hjá borgaranum kemur til sjóndar, samstundis sum borgarin og avvarðandi fáa greiðu á, hvørjar tænastur, borgarin kann fáa.

Tá talan er um borgarar, sum hava bústað í Trivnaðardeplinum hjá AV ella KSØ/TK, kann teirra nærmastu avvarðandi verða kontaktfólk á bústaðnum.
Umráðandi er, at sjúklingur hevur játtað, at kunning verður latin millum stovnarnar og til avvarðandi (váttan um samtykki).

Sjúkrarøktarfrøðingur/heilsurøktari skipar fyri at viðkomandi persónar fáa boð um at koma til samrøðu, og umboð verða vald at fara á fund.

Tað tvørfakliga toymið hittist frammanundan fyri at tryggja eintýðuga kunning.

Uppgávan hjá skrivaranum er at útfylla skjalið *Tvørfaklig niðurstøða* (bilag 1) , og skanna tað í røktarætlan í cosmic hjá sjúklinginum. Eisini er umráðandi at kontaktpersónur í AV og KSØ/TK fær eitt avrit.

Um tørvur er á tí, kann skipast fyri samrøðu við lækna, har hann kunnar um støðu hjá sjúklingi, kanningar, úrslit av hesum, heilivág o.a.

Kunning um hvat fyri hjálp AV ella KSØ/TK kann veita eftir útskrivan.

Ábyrgdarpersónurin í toyminum gevur eina stutta kunning um innleggingartíðina, um málini eru nádd, um ætlanir og møguliga eftirviðgerð.

Útskrivingardagur verður avtalaður, flutningur o.a. sum er viðkomandi í mun útskrivan verður planlagt.

Sjúkrarøktarfrøðingur/heilsurøktari tryggjar at røktarætlan, medisinkort og ambulantar tíðir eru dagførdar. Tann dagførdi medisinlistin og sjúkrarøktarfrágreiðingin skal til heimasjúkrarøktarfrøðingin.

Umráðandi er at tann dagførdi heiligvágslistin og sjúkrarøktarfrágreiðingin verða faksað til Heimatænastuna ella AV, Trivnaðardepilin.
* Tvørfagligt forum: viðkomandi fakpersónar frá AV og Landssjúkrahúsinum/Psykiatriska Deplinum og KSØ/TK.

| Mannagongd- frá innlegging til útskriving | | | |
|---|---|---|---|
| Evni | Tiltøk | Ábyrgd | Sign og dato |
| Um borgarin frammanundan fær tænastu frá Almannaverkinum og ella KSØ/TK, skal kunnast um, at sjúklingur er innlagdur á LS | Seta seg í samband við økisskrivstovuna hjá Heimatænastuni, fyri at fáa hendur á umráðandi kunning, samstundis, avlýsa ta tænastu borgarin fær í heiminum (Sí tlf. Heimatænastan).<br>Seta seg í samband við viðkomandi eind á Trivnaðardeplinum (sí tlf.lista Trivnaðardepilin).<br>Vikudagar kl. 10-15, fríggjadag kl.10-13, kann samband fáast við Viðskiftadepilin, tlf. 36 00 00. | Sjúkrarøktarfrøðingur/ heilsurøktari, sum er um sjúklingin dag 1 ella 2 (toymi) | |
| Játtan frá sjúklingi ella avvarðandi | Sjúkrarrøktarfrøðingur/heilsurøktari fær via váttan um samtykki, loyvi frá sjúklingi at lata upplýsingar millum stovnar. Um sjúklingurin ikki er myndigur er neyðugt at fáa váttan frá avvarðandi.<br>Heimild er at lata upplýsingar víðari uttan samtykki, um borgari livir undir ónøktandi viðurskiftum, vísandi til fráboðanarskylduna í § 38 ì Forsorgarlógini og Kunngerð nr. 37 frá 22. mars 1993 um fráboðanarskyldu sambært forsorgarlógini. | Sjúkrarøktarfrøðingur/ heilsurøktari, sum tekur ímóti sjúklinginum. | |
| Um ivamál er viðvíkjandi heilivági, viðgerð røkt, skamtan o.s.fr. | Lækni/Sjúkrarøktarfrøðingur setir seg í samband við Heimatænastuna ella bústaðin í Trivnaðardeplinum ella KSØ/TK. | Sjúkrarøktarfrøðingur | |
| Um ivamál er um tørvur er á heimavitjan, skulu terapeutar frá Almannaverkinum og /ella KSØ/TK kontaktast | Ergo/fys á Psykiatriska Deplinum seta seg í samband við terapeutarnir. Síðani í samstarvi, hjálpa borgaranum at søkja um hjálpartól, ið honum tørvar til heimið<br>Heimavitjunar-rapport verður send Heimatænastuni og Viðskiftadeplinum á AV.<br>Mánadag – hósdag kl. 10-15 og fríggjadag kl. 10-13, kann samband fáast við Viðskiftadepilin, tlf. 36 00 00. | Kontaktterapeutur | |
| Heimatænastan/Trivnaðar -depilin verður kontaktað beinanvegin, sum útskrivingin verður planløgd. Er talan um nýggjan borgara verður Viðskiftadepilin og ella KSØ/TK kontaktað | Útskriving verður planløgd saman við avvarðandi depli í AV og/ella KSØ/TK.<br>Um tænasta er avlýst, verður hendan bíløgd aftur. | Sjúkrarøktarfrøðingur/ heilsurøktari(toymi) | |
| Hjálpartól | Tryggja, at hjálpartólini eru fingin til vega. Um Psykiatriski Depilin metir, at tørvur er á hjálpartóli, kontakta Viðskiftadepilin á AV. | Ergo/Fysioterapeutar "Kontakt terapeutur" | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Persónligur stuðul ella vardur bústaður. | Ergoterapeutarnir ella sosialráðgevin á Psykiatriska Deplinum setir seg í samband við AV, so skjótt Psykiatriski depilin gerst varugur við tørvin.<br>Er talan um nýggjan tørv, verður áheitan viðgjørd á Viðskiftadeplinum á AV.<br>Er talan um óbroyttan tørv, verður áheitan viðgjørd á Trivnaðardeplinum á AV. | | |

Bilag 1

| **Tvørfaklig niðurstøða** | |
|---|---|
| Navn:<br>P-tal:<br>Innlagdur,dato:<br>Bústaður:<br>Tlf.nr:<br>Egin lækni: | Veiting frá AV<br><br>Avvarðandi:<br>Bústaður:<br>Tlf: |
| **Yrki:**<br><br>**Familju viðurskifti:**<br><br>**Kenningar:**<br><br>**Bústaðarviðurskifti:** | |
| **Psykiskt status:** | |
| **Fysiskt Status:** | |
| **Sosialt status:** | |
| **Kognitiv styrki og trupulleikar:** | |
| **Kommunikatión:** | |
| **Svøvnur/hvíld:** | |
| **Persónligt reinføri:** | |
| **Húð og slímhinnur:** | |

| |
|---|
| |
| **Føðsla:** |
| **ADL:** |
| **Útskiljan:** |
| **Administration av heiligvági:** |
| **Hjálpartól:** |
| **Áhugamál:** |
| **Týdningarmiklar dagligar uppgávur:** |
| **Venjing og virkni meðan innlagdur:** |
| **Sjúkuavgerð/Sjúkugongd:** |
| **Sjúklingsins metan av egnari støðu:** |
| **Frágreiðing til sjúkling/avvarðandi:** |
| **Aktuel sjúkrarøkt:** |
| **Meting:** |

**Rehabiliteringsætlan:**

**Telefonlisti Trivnaðardepilin Almannaverkið**

| Eindarleiðari: | Varaeindarleiðari: | Stovnar: |
|---|---|---|
| Eind 1<br>Jancy B. Klein 297700 | Margee Dam 297710 | Líknagøta 449924<br>Kelduskákið 45632<br>Mýrivegur 456310 |
| Eind 2<br>Hanna Juul 297651 | Oddfríða Højgaard<br>297600 | Sambýlið á Rúnarvegi 3 449424<br>Sambýlið á Rúnarvegi 6448424<br>Sambýlið á Leitisvegi 297606<br>Reiðrið 447003<br>Búfelagsskapurin á Heiðavegi<br>Tlf: 297660 |
| Eind 3<br>Poula Djurhuus 297415 | Hjalmar Joensen 297467 | Sambýlið undir Gráasteini 319270<br>Sambýlið í Pætursgøtu 316422<br>Sambýlið í Sørvági, Ovaravegi 27<br>333338<br>Toymið í Ovarugøtu 297477 |
| Eind 4<br>Birita Clementsen 297453 | Hugo Leo 297376 | Sambýlið í Børkugøtu 1 311442<br>Sambýlið í Svanga 316098<br>Sambýlið á Grønlandsvegi 317518<br>Sambýlið á Bóndaheygi 315917 |
| Eind 5<br>Julianna Næs Olsen 297426 | Elken Holm 297800 | Sambýlið í Stoffalág 64 314664<br>Sambýlið á Bárðarfløtti, Vági 374074<br>Sambýlið í Smærugøtu 29, 321068<br>Frítíðartilboð við Landavegin 297491 |
| Eind 6<br>Elsa Klein Olsen 297371 | Rúna Tausen 297375 | Á Mýruni 4 319958<br>Á Mýruni 6 311478<br>Sambýlið á Fugloyarvegi 315424<br>Sambýlið í Garðsgøtu 318057 |
| Eind 7<br>Jóna Olsen 297420 | Barbara Berg | Eirargarður 315423 í neðra<br>315422 í erva |
| Eind 8<br>Hermann Mortensen 297370 | Elin Danielsen 297400<br>Selma Augustinussen 297811 | Sambýlið á Traðarvegi 34 333345<br>Sambýlið Við Heyggjar 310887<br>Økisdepilin í Vági 370371<br>Sambýlið á Sundsvegi 297401<br>Sambýlið í Niðarugøtu 313463 |
| Eind 9<br>Poulina Johannesen 297630 | Elisabeth Henriksen 297432<br>Katrin Haraldsen 297442 | Verkstaðið Vón 314288<br>Verkhúsið Virkni<br>Verkstaðurin á Brekku 456976<br>Verkhúsið Stíggjur 448944<br>Verkhúsið í Sørvági 333980<br>Verkstaðið á Bakka 373536 |
| Eind 10<br>Hildur Hermannsen 297430 | Gyðja Johannessen 297950 | Familjudepilin 297971<br>Jekarastova 318915<br>Garðsstova 318914<br>Trappustova 297954 |

| | Tlf | Vakttlf. | Faks.nr | T-postur |
|---|---|---|---|---|
| Almannaverkið | 360000 | | 360001 | |
| Norðoya Bú- og Heimatænasta: | | | | |
| - Heimatænastan | 793400 | | 456269 | ht@nbh.fo |
| - Sambýlið á Heygunum | 458483 | | 458183 | sah@nbh.fo |
| - Sambýlið í Bøgøtu | 457343 | | 457443 | sib@nbh.fo |
| - Norðoya Ellis- & | 456775 | | 457924 | nev@nbh.fo |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| røktarheim<br>- Heimið við Vágna<br>- Norðoya Røktarheim<br>- Búðatrøð, dagtilhald<br>- Ven & virka | <br>408400<br>457610<br>223008<br>793408 | | <br>408409<br>457465 | <br>hvv@nbh.fo<br>nr@nbh.fo<br>annikav@nbh.fo<br>vv@nbh.fo |
| Heimatænastan í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu:<br>- Vesturstova (Fuglafj.)<br>- Gøtubrá (Norða Gøta)<br>- Giljagarður (Leirvík) | <br><br><br>730230<br>730250<br>730280 | 730210 | 730211<br><br><br>730231<br>730251<br>730281 | heimatanastan@eystur.fo<br><br><br>vesturstova@eystur.fo<br>gotubra@eystur.fo<br>giljagardur@eystur.fo |
| Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum<br>- heimasjúkrafrøðingurin | 793300 | 793379 | 44 93 49<br><br>449507 | sam@sam.fo |
| VEKS NORÐ: Sunda Eiði<br>VESTUR: Vestmanna Kvívik<br>Sí tel og fax á www.veks.fo | 471050<br>424525 | 793273<br>793274 | 471051<br>424395 | veks@veks.fo |
| Heimatænastan í Vágum<br>- heimasjúkrafrøðingurin | 793200 | 793271 | 353651<br>333992 | htv@htv.fo |
| Økistænastan í Sandoyar Sýslu | 793600 | 793670 | 361891 | ot@ot.fo |
| Bú- og Heimatænastan í Suðuroy | 793500 | | 373908 | oki5@bhs.fo |
| Heilsu- og umsorganartænastan/ Tórshavnar kommuna (TK) | 302000 | 793199 | 317145 | heilsuhusid@torshavn.fo |

# d) Útskrivingarmannagongd uttanlandsøkið

**Útskrivingarmannagongd millum LS/KS (Sjúkrahúsverkið)/ Uttanlandstænastuna og AV og KSØ/TK**

1. Uttanlandstænastan (ULT) boðar AV ella KSØ/TK frá tá sjúklingur verður ávístur til rehabilitering. Er talan um borgara í arbeiðsførum aldri verður eigur altíð at verða boðað frá til AV.

Nýggjur brúkari:
- ULT fær samtykki frá sjúklingi og/ella avvarðandi um fráboðan til AV við neyðugum upplýsingum

Kendur brúkari:
- AV ella KSØ/TK fær boð frá ULT at sjúklingur er farin í rehabilitering

2. AV ella KSØ/TK og ULT útnevna ein kontaktpersón

3. Rehabilitering 3 mðr.

- ULT biður viðgerðarstað um støðutakan til tørv fyri tænastum frá AV ella KSØ/TK so skjótt sum tilber

4. Rehabilitering longri enn 3 mðr.
- ULT/viðgerðarstað sendir status frá teamfundi, sum vanliga verður hildin eina ferð um mánaðin (í Keypmannahavn luttekur sjúklingavegleiðarin hjá Uttanlandstænastuni, sum dagliga arbeiðir á Ríkissjúkrahúsinum)
- Um ikki status frá teamfundi, so biður ULT status frá viðgerðarstaði 3. hvønn mánaða og sendir til AV, KSØ/TK
    - ULT biður viðgerðarstaðið um status av útskrivan at vera ULT og AV ella KSØ/TK í hendi 4 vikur áðrenn útskrivan.

# Fylgiskjal 2 - Mannagongd tá ið óhjálpnir borgarar sum koma til ambulanta viðtalu á LS/KS

**Seinkaður sjúkraflutningur við SFT**

**Endamál**
Talið av ambulantum sjúklingum/borgarum, sum hava tørv á flutningi við SFT veksur alsamt og nærkast uml. 700 árliga. Tað er umráðandi at tryggja sjúklingum/borgarum eitt gott umskifti millum ambulatorii/kanningarstað og SFT og, at sjúklingur/borgari fær nøktandi og neyðuga heilsutænastu í samband við seinkaða heimferð aftaná ambulanta vitjan.

**Allýsingar**
SFT:Sjúkraflutningstænastan
Sjúkraflutningur við SFT: Uppgáva at flyta sjúklingar/borgarar til (ambulanta)viðgerð/kanning á LS/KS og heim aftur. Seinkaður sjúkraflutningur við SFT eftir ambulanta vitjan. Í flestum førum er talan um liggjandi sjúklingar/borgarar, sum skulu flytast frá heimi til LS/KS og aftur til hús. Talan kann eisini verða um flutning frá og til eldrabústovni og øðrum stovnum.

**Lýsing**
Í vanligum førum bíleggur (kommunlækni, heimarøkt, eldrabústovni) flutning av sjúklingi/borgara frá SFT. SFT heintar og flytur sjúkling/borgara til kanningar- og viðgerðasrstaðið á LS/KS fyri síðani at flyta sjúkling/borgara heim aftur eftir ambulanta vitjan.

SFT starvsfólkið boðar avvarðandi ambulatorium frá tá sjúklingurin/borgarin er komin.

Starvsfólk frá avvarðandi ambulatorium/kanningarstaði boðsendir SFT, tá sjúklingurin/borgarin er klárur at fara heimaftur. Tá ið heimferðin verður seinkað er tað ábyrgdin hjá SFT at boða avvarðandi ambulatorium/kanningarstaði frá og upplýsa um longd av bíðitíð.

Starvsfólkið í ambulatoriinum/kanningarstaðnum, skal tryggja sær, at sjúklingurin fær boðini og at sjúklingurin tolir at bíða og er í tryggum hondum. Um sjúklingur/borgari gerst illa fyri ella hevur tørv á hjálp og ella stuðli í bíðitíðini, skal starvsfólki á avvarðandi ambulatorium/kanningarstaði kontaktast og støða verður tikin til evt. neyðug tiltøk. Um talan er um eina bráðfeingisstøðu, skal sjúklingurin/borgarin sum vanligt meldast til Bráðmóttøkuna á LS ella Skaðastovuna á KS.

Tann fakliga ábyrgdin liggur hjá ambulanta viðgerðar- og kanningarstaðnum. Ein sjúklingur/borgari ið ikki klárar seg sjálvan, skal ikki sleppast av hondum fyrrenn næsta lið er klárt at taka sær av viðkomandi. Eftir vanliga arbeiðstíð og tá ið ambulatoriið (vanliga)/kanningarstaðið hevur stongt, er tað læknaliga forvaktin sum skal kontaktast, um ein sjúklingur/borgari á ein ella annan hátt hevur tørv á hjálp, meðan hann bíðar eftir flutningi. Tað kann gerast neyðugt at flyta ein sjúkling/borgara á eina deild meðan bíðað verður eftir flutningi, ella av øðrum orsøkum og verður hetta gjørt í samráð við forvaktina á avvarðandi depli.

AV ella KSØ/TK metir um og tekur støðu til um borgari, sum býr á stovni hjá AV ella KSØ/TK, og fer til ambulanta viðtalu á LS ella KS, hevur tørv á at hava fylgjara t.d. avvarðandi ella starvsfólk frá stovninum við sær á LS/KS.

## f) Leypandi kunning frá LS/KS til AV ella KSØ/TK um liðugt viðgjørdar sjúklingar

**Mannagongd**
LS/KS senda vikuliga kunning til AV, KSØ/TK við yvirliti yvir liðugt viðgjørdar sjúklingar. Nærri verður avtalað um form og innihald.

Partarnir vilja í 2015 ársfjórðingi arbeiða við at finna eina sjálvvirkandi elektroniska og trygga loysn til umskifti av hesum upplýsingum.

# Fylgiskjal 3 – Smittuverjufrøði

Smittuverjufrøðingurin á LS vegleiðir í øllum spurningum, ið hava við fyribyrging av smittuspjaðing at gera, og skipar fyri smittuverjuskeiðum fyri sjúkrarøktarfrøðingum og røktarstarvsfólki, ið starvast í Almannaverkinum.

Umráðini, ið Smittuverjufunktiónin kann veita tænastur á, eru:
a). Ráðgeving um smittufyribyrgjandi sniðgeving og innrætting av nýbyggingum og umbyggingum.
b). Ráðgeving og í samband við keyp av røktar-og viðgerðartólum og av heilsuráðvørum, ið verður brúkt í røkt og viðgerð í AV og heima hjá einstaka borgaranum í skipanini hjá AV.
c). Íverksetan av smittuforðandi tiltøkum og viðgerðum, tá ið umfarssótt ella tá upphóping av infektiónum koma fyri av MRSA (Meticillin resistentum Staphylococcus areus).
d). Uppskot til reglugerðir og leiðbeiningar í smittuverju.

Tænasturnar eru sum útgangsstøði uttan viðurlag.

Starvsfólk í AV og KSØ/TK kunnu luttaka í smittuverjuskeiði á LS móti rímiligum luttøkugjaldi.

# Fylgiskjal 4 – Medisinsk samstarvsøki

**Palliativa toymið á LS**
Palliativa toymið er tøkt til undirvísing í AV ella KSØ/TK sbrt. nærri avtalu og bjóðar LS heimasjúkrarøktarfrøðingum hjá KSØ/TK at koma á LS til ráðgeving.

**Borgarar (upp til 67 ár) við heilaskaða o.l. samansettum tørvi**
Fylgir mannagongdini innan útskrivingarmannagongd við samansettum tørvi.
Sera týðandi at AV ella KSØ/TK altíð fær fráboðan í heilt góðari tíð. Hetta verður gjørt í samráð við sjúkling ella avvarðandi/verja!

**Umskifti av upplýsingum millum Barnadeildina B5 á LS og AV/Viðskiftadepilin**
Sbrt. §38 í forsorgarlógini skulu persónar, ið útinna almenna tænastu ella starv, boða Almannaverkinum frá, tá hesir í yrki sínum fáa kunnleika um viðurskifti, ið geva gruna um, at tørvur er á almannahjálp í ávísum føri. LS skal brúka galdandi oyðublað: Fráboðan frá lækna um staðfest brek/sjúku hjá barni.

# Fylgiskjal 5 – Skurðsamstarvsøki

Skurðdepilin/G4 á LS er tøkur til undirvísing í AV, KSØ/TK sbrt. nærri avtalu innan stomi-røkt, kateturrøkt.

Partarnir samstarva og umskifta royndir og vitan innan sárrøkt.

# Fylgiskjal 6 – Psykiatrisk samstarvsøki

**Undirvísingartilboð til AV**
Psykiatriski Depilin/B&U bjóðar seg fram til eftir nærri avtalu at miðla vitan innan sjúkueyðkenni, heilivág o.l. Hetta við tí endamáli at stuðla AV, KSØ/TK í teirra virksemi.

**Psykoedukatión og avvarðandi undirvísing**
Psykiatriski depil bjóðar leypandi undirvísing innan ymisk evni til sjúklingar og avvarðandi.
T.d.
- Psykosu og Skizofreni á 2½ tíma 6 ferðir
- Depressión á 2½ tíma 6 ferðir
- Persónleikaólag á 2½ tíma 4 ferðir

Harumframt bjóðar Psykiatriski depilin undirvísing í evninum:
"Góð ráð og vegleiðing til avvarðandi"

**Demensøkið**
Eftir nærri avtalu kann Demensklinikkin bjóða undirvísing á stovnum hjá AV og KSØ/TK.

**Markamót Ambulant psykiatri-økispsykiatri/Heimatænasta /Eind 8 - socialpsykiatri**
Integrerað Psykiatri, Lysekilsmodellen, sum vit nevna *"samskapað heildarpsykiatri"* er ein skipan, sum ambulant psykiatri/økispsykiatri arbeiðir eftir.
Kjarnan í samskapandi heildarpsykiatri er at rehabiliterandi røktar- og viðgerðartiboðini eru í nærumhvørvinum, eru ambulant og tilboðini eru tvørfaklig og virka samanahangandi fyri borgaran - sum ein eind

Endamál:
At bjóða fólki við psykiatriskari sjúku eina dygdargóða rehabiliterandi røkt og viðgerð sum tekur støðið í nýggjastu gransking, virkar heilsufremjandi, fyribyrgjandi og rehabiliterandi[2]

Keldur/referancur.[3]

**Lýsing av arbeiðsuppgávum**
Tann ambulanta psykiatriin/økispsykiatriin á Psykiatriska Deplinum er fyri aldursbólkin 15 og uppeftir.
Arbeiðsøkið umfatar:

- Rehabiliterandi røkt og viðgerðartilboð
- fyribyrging av afturstigi
- víðari viðgerð(kognitiv terapi)
- tíðliga innsatsur fyri at fyribyrgja versnandi støður
- uppsøkjandi arbeiði
- ráðgeving og undirvísing til brúkara, avvarðandi og samstarvspartar

Ávísing.
Ávísing frá kommunulækna krevst um talan er um ambulanta psykiatriin/økispsykiatri skal innganga í

---

[2] Psyk depl. 2014 (Samskapaða psykiatri)
[3] Psykiatriski deplin, LS arbeiðir yvirskipað eftir referancuprogrammum, sum Sundhedsstyrelsen og Socialstyrelsen mæla til. Rehabiliteringshugsjónin er tengd at psykiatriskari rehabiliteringsgongdini, sum Anna Lindhardt, Lene F. Eplov, Lisa Korsbek, Lone Petersen, Mette Olander , Merete Nordentoft, sum granska í rehabilitering og recovery á ávikavist Granskingardeildini á Bispebjerg sjúkrahúsi, Ballerup psykiatrisk center, forskningsenhed og Psykiatrifonden í Danmark.

eina uppgávu. Kommunulæknin sendir ávísing við frágreiðing um støðuna til Psykiatriska Depilin, har verður fyrispurningurin mettur og um so er, so víðari til Økispsykiatriina. **Kommunulæknin er alla tíðina persónligi læknin hjá einum og hvørjum borgara.**

**Lýsing av arbeiðsbýti**
Starvsfólkini, ið arbeiða innan ambulanta psykiatri/økispsykiatri hevur serkunnleika innan psykiatriska røkt og viðgerð. Har talan primert er um psykiatriskan problematikk hevur sjúkrarøktarfrøðin í ambulantari psykiatri uppgávuna sum casemanager.
Uppgávan hjá sjúkrarøktarfrøðinginum er:

- metan av støðuni hjá borgara fysiskt, psykiskt og sosialt
- í samráð við borgaran taka stig til viðgerð og broyting av viðgerð í samráð við psykiatara alt eftir støðuni hjá borgara
- stuðla, motivera og uppmuntra borgaran til framhaldandi menning og náa persónlig mál
- fyribyrgja afturstigi,
- hevur samtaluterapi/kognitiva terapi við brúkaran og venjingar í samband við tað
- Hevur psykoedukatión við brúkara og styrkibólk/avvarðandi, alt samsvarandi integrerað/samskapað psykiatri

Heilivágsgevan
Tað verður mælt til, at í hvørjum einstøkum føri, hvør geiri hevur heilivágan um hendi hjá einstaka borgaranum.

Sosialpsykiatri
Sosialpsykiatriin í Almannaverkinum hevur til endamáls at stuðla persónum við sosialum og sálarligum avmarkingum og skapa karmar, so teir hava møguleika at liva eitt so sjálvstøðugt, virðiligt og virkið lív sum til ber.

Sosialspykiatriin veitir tænastu um alt landið. Í Sosialpsykiatriini starvast tvørfaklig toymi við vitan innan psykiatri. Í Sosialspykiatriini verður m.a. arbeitt við støði í Recovery, Miljøterapi og Kognitivari terapi.

Sosialpsykiatrisku toymini veita einstaklingasamrøður umframt ráðgeving og vegleiðing til borgaran á 8 ymiskum virkisumráðum, har treytin er at borgarin sjálvur er virkin og at møguleiki er fyri menning. Tey 8 virkisumráðini eru hesi: Húsarhald, persónlig røkt, kostur, flytføri, bústaðarviðurskifti, sosialt samband við onnur, áhugamál/ítriv og arbeiði/útbúgving. Stuðul verður ikki veittur til persónliga røkt og reingerð.

Sosialpsykiatriin hevur sum mið at stuðla borgaranum í:

- At gerast frælsari og mennast.
- At halda persónligar førleikar við líka.
- At fáa ein so virðiligan gerandisdag, sum fyritreytirnar hjá viðkomandi loyva tí.
- At menna sambandi við sosiala og almenna trygdarnetið.
- At fáa ráðgeving og vegleiðing í persónligum viðurskiftum.
- At gerast so sjálvbjargin, sum fyritreytirnar hjá viðkomandi loyva tí.

Hetta virksemið kann vera bæði í heiminum og uttan fyri heimið umframt á veristøðunum hjá Sosialpsykiatriini. Á veristøðunum verður dentur lagdur á sosiala førleikamenning, at borgarin fær ein skipaðan gerandisdag, kann luttaka í sosialari samveru og hitta onnur, kann varðveita og/ella menna førleikar umframt at fyribyrgja afturstig.

Í arbeiðinum verður m.a. dentur lagdur á at veita borgaranum ráðgeving og vegleiðing í at skipa og hava yvirlit yvir egin fíggjarviðurskifti, umframt ráðgeving og vegleiðing í samskiftinum við lækna,

sjúkrahús, sosialar myndugleikar og onnur. Eisini verður veitt vegleiðing við atliti til áhugamál/ítriv og arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikar hjá borgaranum.

Ymisku tænasturnar hava servitan innan teirra starvsøki og kunnu hava ymiska vitan um borgaran og hansara støðu. Tænasturnar samstarva á jøvnum føti, og er tað av stórum týdningi, at borgarin og hansara tørvur eru í miðdeplinum. Við samstarvi millum teir ymisku tænasturnar skapast møguleikar fyri at gagnnýta førleikar hjá starvsfólkunum borgaranum til fyrimuns. Til hetta krevst at samtala verður við jøvnum millumbili um støðuna hjá borgaranum og um arbeiðsbýtið millum teir ymisku partarnar.

**Mál við samstarvstilgongdini**
a) At við støði í Samskapað røkt og viðgerð, at kunna veita borgaranum eina heildarpsykiatriska tænastu.
b) At Økispsykatri, Sosialpsykiatri og Heimatænastan eru partar av "samlaða" tvørfakliga og tvørsektoriella liðinum um brúkara har tørvur er á hesum.
c) At øll í felag virka sum eitt samlað lið fyri brúkaran við denti á serkunnleika og førleikar til sjálva uppgávuna og eru felags um heildina/persónin sum vit hava felags. Samskipan av uppgávum og eftirmeting skal vera í fokus við jøvnum millumbili.

**Samstarv og samskipan millum Økispsykiatriina, Sosialpsykiatriina og Heimatænastunar**

*Talan er vanliga um fylgjandi hættir:*
1. Telefoniskt kontakt ella samrøða um ítøkilig mál ella generel viðurskifti

2. Netfundur
Í einstøku økjunum verður skipað fyri tvørsektoriellum og tvørfakligum samstarvsfundi í 1½ tíma umleið 6. hvørja viku. Skiftandi ábyrgd av fundinum millum LS, AV og KSØ/TK. Tey sum møta eru: Økispsykiatriin, Heimatænastan og Sosialpsykiatriin. Partarnir taka upp teir borgarar, sum tey meta eru viðkomandi. Tað verður ikki skrivað felags referat í dag (tað mugu vit arbeiða fram ímóti), men hvør partur skjalfestir tað eftirfylgjandi, sum verður mett at hava týdning.

3. Styrkibólkar

Stóri styrkibólkur:
Í hesum styrkibólki er borgari, avvarðandi og fakfólk(starvsfólk, ið á ein ella annan hátt eru knýtt at borgaranum). Liminir hittast hægst 2 ferðir um árið. Tann yvirornaða rehabiliterandi røktar- og viðgerðar ætlanin, framgongdin, heilivágsætlanin og uppfylgingin verður eftirmett[4]

Lítli styrkibólkurin:
Her hittast borgari, avvarðandi og kontaktpersónur. Um onnur fakfólk hava ein týðandi leiklut verða hesin boðin við. Gjøgnumgong av deilmálum, framstig og kontiuenteturin í sjúklingagongdini verða eftirmett. Liminir hittast eftir tørvi [5]

4. Aðrir fundir
Fundir við sosialar myndugleikar, barnaverd, Dugna, socialráðgeva (AV) viðv. bústaðar- og peningaviðurskifti. Borgarin er sjálvur við til hesar fundir.

Til netverksfundir har brúkarin sjálvur er við – har tað bert er talan um hansara støðu sum verður tikin upp, har verður sum oftast referat skrivað av fundinum. Brúkarin sjálvur fær avrit, somuleiðis

[4] Norden 2012 Intergrerad psykiatri

[5] Norden 2012 Intergrerad psykiatri

hini sum hava luttikið á fundinum. Tann sum er innkallar til fundin við dagsskrá skrivar referat og sendir út.

**Førleikamenning og undirvísing**

Ymsu samstarvspartarnir leggja seg eftir at bjóða hvørjum øðrum við til skeið sum teir skipa fyri. Avtalað verður frá ferð til ferð um tað er við ella uttan gjald.

Sosialpsykiatriin veitir psykoeducation og undirvísing innan t.d. sosialan førleika menning, kognitiva viðgerð, miljøterapi, recovery til borgarar, avvarðandi, skúlar og aðrar samstarvsfelagar. Avtalað verður gjørd áðrenn undirvísingina um møguligan kostnað.

Hetta verður gjørt sum intern undirvísing á bústovnum og í ymisku toymunum.

Socialráðgevarafunktiónin í Menningardeplinum hjá AV kann undirvísa í eitt nú grundleggjandi rættindum innan sociala økið.

**Samskifti**
Samskifti um yvirornaða planlegging um førleikamenning, undirvísing og evt. broytingar gongur vanliga umvegis leiðaran í Økispsykiatriini og leiðaran fyri sjúkrarøktarfrøðingum í heimatænastuni og leiðaran fyri Sosialpsykiatriina/Eind 8, umframt socialráðgevarar í Menningardeplinum og Viðskiftadeplinum hjá AV.

**Umskifti av upplýsingum millum Psykiatiska Depilin og Heimatænastuna hjá KSØ/TK og Sosialpsykiatriina/Eind 8**
Tá tað verður mett viðkomandi av LS, KSØ/TK ella AV, kunnu partarnir umskifta viðkomandi upplýsingar um borgaran/sjúklingin. Neyðugt er at fáa samtykki til vega frá borgaranum ella frá verja til umskifti av upplýsingum. Samtykki er munnligt ella skrivligt eftir umstøðunum og verður ført í THS á LS og journaliserað hjá AV ella KSØ/TK.

**Møgulig serlig viðskifti/frávik í einstøkum økjum**
Í einstøkum førum fylla sjúkrarøktarfrøðingar í Økispsykiatriini sjálvar heilivág í eskjur hjá brúkarum, ella geva inj. av depotheilivági

# Samstarvsmannagongd millum sjúkrarøktarfrøðingar í Heimasjúkrarøktarskipanunum (Heimatænastunum) og sjúkrarøktarfrøðingar í Økispsykiatriini

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Evni.: | Heimabúgvandi sjúkl. ið fáa tænastur frá sjrfr. í Heimatænastuni og Økispsykiatriini | Endamál: | At tryggja borgaranum samanhang í tænastuni |
| | Gjørt: | MáF, AN og TC, Heimatænastan<br><br>ID og RB psyk. depil | Góðkent: | ÁD og BA |
| | Dato: | Juli 2014 | Endurskoðast: | |

| | |
|---|---|
| Evni:<br><br>Mannagongd fyri samstarv har Økispsykiatri er á staðnum | • Heimatænastan og Økispsykiatriin kunnu seta seg beinleiðis í samband við hvønn annan, við spurningum, ivamálum og øðrum.<br>• Um Økispsykiatriin skal verða partur av eini framhaldandi viðgerð, skal ávísing koma frá kommunulækna til psykiatriska depilin.<br>• Innleggjan av borgara, verður framd av kommulæknanum.<br>• Kunnast skal millum skipanirnar, tá broyting er í heilsustøðuni og viðgerðini.<br>• Samskift verður gjøgnum telefon og faks. |
| Mannagongd fyri samstarv har eingin økispsykiatri er á staðnum. | • Um ivamál eru, kann Heimatænastan í:<br>- Sandoy kontakta Økispsykiatriina í Havn<br>- Vágoy kontakta Økispsykiatriina í Norðstreymoy<br>- Suðuroy kontakta leiðarin í Økispsykiatriini<br>• Økispsykiatriin verður kontaktpersónur fyri heimasjúkrarøkarfrøðingar og kann koma við ráðum og tilmælum viðvíkjandi røkt og viðgerð.<br>• Økispsykiatriin kann venda spurningar við psykiatara, sum kemur við tilmælum. |
| Umsiting av heilivági | • Tað skal fyriliggja ein dagførdur heilivágslisti.<br>• Í høvuðsheitum er tað Heimatænstan sum umsitur, bíleggur og gevur heilivágin. |
| Samtykki | Váttan um samtykki skal fyriliggja áðrenn samskifti millum skipanirnar byrjar. |
| Kontakt | Heimatænastan kann kontaktast í dagtímunum.<br>Aðrar tíðir ber til at ringja til vakttelefonina, tá t.d. talan er um innleggjan og annað, sum kann viðføra broyting fyri arbeiðsgongdina næstu dagarnar.<br>Heimatænastan tekur ikki ímóti útskrivaðum sjúklingum gjøgnum vakttelefonina. |

| | Tlf | Vakttlf. | Faks.nr | T-postur |
|---|---|---|---|---|
| Norðoya Bú- og Heimatænasta: | | | | |
| - Heimatænastan | 793400 | | 456269 | ht@nbh.fo |
| - Sambýlið á Heygunum | 458483 | | 458183 | sah@nbh.fo |
| - Sambýlið í Bøgøtu | 457343 | | 457443 | sib@nbh.fo |
| - Norðoya Ellis- & røktarheim | 456775 | | 457924 | nev@nbh.fo |
| - Heimið við Vágna | | | | |
| - Norðoya Røktarheim | 408400 | | 408409 | hvv@nbh.fo |
| - Búðatrøð, dagtilhald | 457610 | | 457465 | nr@nbh.fo |
| - Ven & virka | 223008 | | | annikav@nbh.fo |
| | 793408 | | | vv@nbh.fo |
| Heimatænastan í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu: | | 730210 | 730211 | heimatanastan@eystur.fo |
| - Vesturstova (Fuglafj.) | 730230 | | 730231 | vesturstova@eystur.fo |
| - Gøtubrá (Norða Gøta) | 730250 | | 730251 | gotubra@eystur.fo |
| - Giljagarður (Leirvík) | 730280 | | 730281 | giljagardur@eystur.fo |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum<br>- heimasjúkrafrøðingurin | 793300 | 793379 | 44 93 49<br>449507 | sam@sam.fo |
| VEKS NORÐ: Sunda Eiði<br>VESTUR: Vestmanna Kvívik<br>Sí tel og fax á www.veks.fo | 471050<br>424525 | 793273<br>793274 | 471051<br>424395 | veks@veks.fo |
| Heimatænastan í Vágum<br>- heimasjúkrafrøðingurin | 793200 | 793271 | 353651<br>333992 | htv@htv.fo |
| Økistænastan í Sandoyar Sýslu | 793600 | 793670 | 361891 | ot@ot.fo |
| Bú- og Heimatænastan í Suðuroy | 793500 | | 373908 | oki5@bhs.fo |
| Heilsu- og umsorganartænastan/ Tórshavnar kommuna (TK) | 302000 | 793199 | 317145 | heilsuhusid@torshavn.fo |
| Almannaverkið | 360000 | | 360001 | |

Økispsykiatriin kann kontaktast allar gerandisdagar millum kl. 08.00 til 16.00.

| | **Tlf** | **Teldupost** |
|---|---|---|
| **Leiðari**<br>Birgit Andersen | <br>234557 | <br>lsbiran@ls.fo |
| **Norðoyggjar**<br>Mirjam M. Heinesen<br>Sigrun D. Hansen | <br>234576<br>234577 | <br>lsmirma@ls.fo<br>lssighn@ls.fo |
| **Eysturoy**<br>Borghild á Fløghamri<br>Maibritt Jacobsen | <br>234671<br>234575 | <br>lsborgfl@ls.fo<br>lsmaija@ls.fo |
| **Norðstreymoy**<br>Dorthea Ellingsgaard<br>Morid Johannesen<br>Joan Danberg | <br>234670<br>234578<br>234672 | <br>lsdorel@ls.fo<br>lsmorjo@ls.fo |
| **Suðurstreym**<br>Anna Simonsen<br>Ingun Durhuus<br>Elisabeth Hansen | <br>234574<br>234579<br>234679 | <br>lsannsi@ls.fo<br>lsingdu@ls.fo<br>lselihs@ls.fo |

Um tørvur er á bráðfeingis hjálp, verður víst til kommunulæknan ella vaktlæknan.

## Samstarvsmannagongd millum sjúkrarøktarfrøðingar í Heimatænastuni og í Økispsykiatriinii:

*Har økispsykiatri er á staðnum.*
*Har eingin økispsykiatri er á staðnum.*

Arbeiðsbólkurin varð settur saman við tí endamáli, at fáa eina samtarvsmannagongd í lag. Tað hevur verið ein saknur í røktini av borgarum, at einki formelt samstarv hevur verið, og tí er bólkurin farin í gongd við at fella hetta niður á blað.
Sum støðan er í dag, er Økispsykiatriin ikki virkin yvir allar Føroyar. Hetta hava sjúkrarøktarfrøðingar í Heimatænastuni saknað, tí tær hava ongan at ráðføra seg við, tá trupulleikar stinga seg upp hjá borgarum við sálarligum sjúkum.
Økini, sum ikki hava Økispsykiatri í dag eru Vágoy, Sandoy og Suðuroy. Endamálið hjá bólkinum er at gera eina mannagongd, sum førir til, at til ber hjá hesum økjum at fáa ráð og/ella tilmælir frá Økispsykiatriini. Eisini er uppgávan at skipa eitt samstarv, har Økispsykiatri er á staðnum.
Í desember 2013 varð ein samstarvsavtala millum Landsjúkrahúsið og AV undirskrivað. Henda avtala hevur sett fokus á arbeiðsøkið hjá Økispsykiatri og Heimatænastu, og gevur arbeiðsbólkinum eina greiða arbeiðslinju.

**Samstarvsmannagongd, har Økispsykiatri er í økinum:**
Tað eru fleiri borgarar, sum fáa vitjan av sjúkrarøktarfrøðingi bæði frá Heimatænastuni og Økispsykiatriini. Tað er tí týdningarmikið fyri borgaran, at sjúkrarøktarfrøðingar frá hesum báðum tænastum kunnu samstarva um røkt og viðgerð, so sum at gera avtalur um hvør hevur ábyrgd av hvørjum, nær vit fara inn til borgaran, hvør ger hvat og boða hvørjum øðrum frá, tá broytingar eru. Heimatænastan og Økispsykiatriin kunnu seta seg beinleiðis í samband við hvønn annan viðvíkjandi spurningum, ivamálum og øðrum. Um Økispsykiatriin skal vera partur í eini framhaldandi viðgerð, skal ávísing koma frá kommunulækna til psykiatriska depilin.

Regluligir fundir eru millum Heimatænastuna, Sosialpsykiatriina og Økispsykiatriina. Hesir fundir eru 6. hv. viku. Á hesum fundum verða ymisk viðkomandi evnir tikin upp, sum hava til endamáls, at geva borgaranum eina so góða og fjølbroytta røkt og viðgerð sum gjørligt. Tað er týdningarmikið, at vit vita hvørjar uppgávur eru og hvør hevur ábyrgdina av hvørjum. Eisini er tað týdningarmikið, at vit hava eitt forum, har ivamál verða tikin upp til dialog.
Um ein borgari skal innleggjast, verður hettar gjørt av kommunulæknanum.

Tann, sum hevur vitan um eina innleggjan, kunnar víðari til aðrar samstarvspartar, (sosialpsykiatri, heimatænastu, økispsykiatri). Samskiftismiðil hesum viðvíkjandi er í løtuni telefon ella faks.

**Samstarvsmannagongd, har eingin Økispsykiatri er í økinum:**
Tað eru 3 oyggjar, har Økispsykiatriin ikki er implementerað. Hesar eru Vágoy, Sandoy og Suðuroy. Tað ein avbjóðing hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Heimatænastuni at røkta borgara við sálarligum trupulleikum, tí tær mangla serkunnleika innan psykiatri. Tær standa ofta einsamallar við truplum støðum og hava ikki møguleika at ráðføra seg við serkunnleika á staðnum.

Vit í arbeiðsbólkinum eru komnar fram til ein leist til samstarv millum Heimatænastuna og Økispsykiatriina. Heimatænastan fær møguleika at seta seg í samband við Økispsykiatriina, tá tær standa í truplum støðum og spurningum viðvíkjandi røkt og viðgerð. Um Økispsykiatriin hevur ivamál innan serkunnleikan hjá Heimatænastuni, er møguleiki at kontakta Heimatænastuna.
Í samstarvsavtaluni millum Landsjúkrahúsið og AV verður víst á, at Sandoyggin kemur undir Havnina, Vágoyggin kemur undir Norðstreymoy og Suðuroy verður eitt øki fyri seg. Til henda ætlan verður framd í verki, mæla vit í arbeiðsbólkinum til at:

- Heimasjúkrarøktarfrøðingar í Sandoy kontaktar Økispsykiatriina í Havn
- Heimasjúkrarøktarfrøðingar í Vágoy kontaktar Økispsykiatriina í Norðstreymoy
- Heimasjúkrarøktarfrøðingar í Suðuroy kontaktar leiðaran fyri Økispsykiatriina

Av tí at Økispsykiatriin enn ikki er virkin í hesum økjum, verður uppgávan at koma við ráðum og/ella tilmælum í mun til tann einstaka borgaran. Eitt nú kann Økispsykiatriin venda spurningum frá sjúkrarøktarfrøðingum í Heimatænastuni við psykiatara, sum kemur við tilmælum. Um talan verður um t.d. broytan av heilivági ella innleggjan, verður kommunulæknin í økinum kunnaður um tilmælið og tekur endaliga avgerð.

Økispsykiatriin verður sostatt kontaktpersónur fyri heimasjúkrarøktarrøðingar úti í økinum og kann koma við ráðum og tilmælum um røkt og viðgerð.

**Umsiting av heilivági**
Tað skal altíð fyriliggja ein dagførdur heilivágslisti til Heimatænastuna. Um broytingar verða gjørdar, skal ein dagførdur listi útflýggjast Heimatænastuni. Heimatænastan hevur ikki atgongd til THS (Cosmic).
Vísandi til avtalu um samstarv millum Landsjúkrahúsið og AV frá 19. des. 2013:

*Heimasjúkrarøktarskipanin í Menningar- og Eldradeplinum hevur ábyrgd av røkt og røktarviðurskiftum við somatiskum sjúkum, umframt injektión/depotviðgerð av psykofarmaka. Heimatænastan hevur somuleiðis uppgávuna at dispensera psykofarmaka í eskir til brúkaran.*
***Heilivágsviðurskifti og arbeiðsbýti***
*Alt depotmedisin og fylling av medisin í eskjur verður givið/gjørt av heimasjúkrarøktarskipanini.*

***Møgulig serlig viðskifti/frávik í einstøkum økjum /førum***
*Í einstøkum førum fylla sjúkrarøktarfrøðingar í Økispsykiatriini sjálvar heilivág í eskjur hjá brúkarum og geva inj. av depotheilivági.*

Tann sum gevur og umsitur heilivágin, hevur eisini til uppgávu at bíleggja hendan, um borgarin ikki megnar tað sjálvur.
Bíleggjast kann frá kommunulækna ella psykiatriska deplinum. Hetta er tó bert galdandi til borgarar sum eru eru í Psykiatrisku skipanini.
Psykiatriski depilin:

- Teldupost: psykmed@ls.fo
- Telefon: 304500 skrivarin á Psykiatriska deplinum

# Samstarvsavtala millum ráðgevar á Viðskiftadeplinum og sjúkrarøktarfrøðingar í Økispsykiatriini.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| almannaverkið<br>Landssjúkrahúsið | Evni.: | Heimabúgvandi borgarir, ið fáa tænastur frá Viðskiftardeplinum og Økispsykiatriini | Endamál: | At tryggja borgaranum samanhang í tænastuni |
| | Gjørt: | BUP, EPØ, Viðskiftadepilin BA, AS og EH Psykiatriski Depilin | Góðkent: | Berit Unn Petersen (Viðskiftadepilin) og Birgit Andersen (Økispsykiatriin) |
| | Dato: | februar 2015 | Endurskoðast : | Ultimo mai 2015 |

**Evni:**

**Mannagongd fyri samstarv har Økispsykiatri er á staðnum**

- Tað eru fleiri borgarar, ið bæði hava samband við Økispsykiatriina og Viðskiftadepilin. Tað er tí týdningamikið fyri borgaran, at starvsfólk frá hesum báðum tænastum kunnu samstarva fyri at gera viðgerðina meira samanhangandi.
- Viðskiftadepilin og Økispsykiatriin kunnu seta seg beinleiðis í samband við hvønn annan, við spurningum, ivamálum og øðrum.
- Samskift verður gjøgnum telefon og teldupost.
- Samstarv kann fevna um bæði vitanardeiling, felags samstarvsøkir (samstarvsfundir) og ítøkiligt mál (netfundir).
- Samstarvsfundir (uttan borgaran). Regluligir fundir eru millum Viðskiftadepilin og Økispsykiatriina saman við Heimatænastuni og Sosialpsykiatriini. Hesir fundir eru 6. hvørja viku. Á hesum fundum verða viðkomandi evni tikin upp, sum hava til endamáls at geva borgaranum eina góða og fjøltátta røkt og tænastu sum gjørligt. Tað er týdningarmikið, at vit vita hvørjar uppgávu eru og hvør hevur ábyrgdina av hvørjum. Eisini er tað týdningarmikið, at vit hava eitt forum, har ivamál verða tikin upp til dialog.
- Netfundir (har borgarin er við). Økispsykiatriin kann bjóða Viðskiftadepilinum við á netfund og Viðskiftadepilin kann bjóða Økispsykiatriini við á netfund.
- Um Økispsykiatriin skal verða partur av eini framhaldandi viðgerð, skal ávísing koma frá kommunulækna til Psykiatriska depilin.
- Um Viðskiftadepilin skal verða partur av eini framhaldandi viðgerð, skal umsókn koma frá borgarinum til Almannaverkið.

**Evni:**

**Dømi um samstarv**

- Økispsykiatriin kann virka sum vegleiðari í samband við, at borgarin skal í skúla ella á arbeiðsmarknaðin. Tá ið Viðskiftadepilin setur fyriskipanir í verk fyri borgara ella fylgir uppá fyriskipanir kann sjúkrarøktarfrøðingur frá Økispsykiatriin møta við á fund við skúla ella arbeiðsgevara. Økispsykiatriin kann eisini vera kantaktfólk hjá arbeiðsplássinum í mun til ráðgeving og sparring.
- Starvsfólk í Økispsykiatriini og í Viðskiftadeplinum kunnu gera brúka av teimum ymisku førleikunum vit hvør í sær hava í mun til vitanardeiling. T.d. um ráðgevi í Viðskiftadeplinum tørvar vitan um ávísa sjúku.
- Økispsykiatriin kann venda sær Viðskiftardepilin, fyri at fáa upplýst, hvør ráðgevi er í málinum á Almannaverkinum.

**Evni:**

**Samtykki**

Váttan um samtykki skal fyriliggja áðrenn samskifti millum skipanirnar byrjar

**Evni:**

**Kontakt**

<u>Viðskiftadepilin</u> kann kontaktast allar gerandisdagar á telefon 36 00 00 frá kl. 10:00 til 15:00 mánadag til hósdag og fríggjadag kl. 10:00 til 13:00. Eisini ber til at senda teldupost á av@av.fo.

| | **Tlf** | **Teldupost** |
|---|---|---|
| **Depilsstjóri**<br>Hallur Thomsen | 347040/297040 | hallurt@av.fo |
| **Deildarleiðari**<br>Berit Unn Petersen | 387310/297310 | beritp@av.fo |
| **Streymoy, Eysturoy, Vágarnar og Sandoy**<br>Ebba Parker Øre<br>Birita Jaspursdóttir Joensen<br>Marjun Klein Kragesteen<br>Sigrun Bærentsen | <br>347044/297044<br>387308/297308<br>347077/297044<br>347043/297043 | <br>ebba@av.fo<br>biritajj@av.fo<br>marjunk@av.fo<br>sigrunb@av.fo |

| | | |
|---|---|---|
| Judith S. Finnsson<br>Maria Johansen | 347035/297035<br>387317/297317 | judithf@av.fo<br>mariajo@av.fo |
| **Suðuroy**<br>Mary Midjord | 347088/297088 | marym@av.fo |
| **Norðoyggjar**<br>Valborg Heldarskarð Josephsen | 347086/297086 | valborgj@av.fo |

Økispsykiatriin kann kontaktast allar gerandisdagar millum kl. 08.00 til 16.00.

| | Tlf | Teldupost |
|---|---|---|
| **Leiðari**<br>Birgit Andersen | 234557 | lsbiran@ls.fo |
| **Norðoyggjar**<br>Mirjam M. Heinesen<br>Sigrun D. Hansen | 234576<br>234577 | lsmirma@ls.fo<br>lssighn@ls.fo |
| **Eysturoy**<br>Borghild á Fløghamri<br>Maibritt Jacobsen | 234671<br>234575 | lsborgfl@ls.fo<br>lsmaija@ls.fo |
| **Norðstreymoy**<br>Dorthea Ellingsgaard<br>Morid Johannesen<br>Joan Danberg | 234670<br>234578<br>234672 | lsdorel@ls.fo<br>lsmorjo@ls.fo |
| **Suðurstreym**<br>Anna Simonsen<br>Ingun Durhuus<br>Elisabeth Hansen | 234574<br>234579<br>234679 | lsannsi@ls.fo<br>lsingdu@ls.fo<br>lselihs@ls.fo |

Um tørvur er á bráðfeingis hjálp, verður víst til kommunulæknan ella vaktlæknan.

# Fylgiskjal 7 - Samstarv innan eftir- og víðariútbúgving

**Klinisk økir o.a.**

Í tann mun nýggir viðgerðarhættir og nýggjar mannagongdir, sjúklingagongdir verða settar í verk, eiga LS, KS, AV og KSØ/TK at meta um, um starvsfólk hjá hvørjum øðrum kundu havt fyrimun av at fingið kunning v.m.

Tá partarnir skipa fyri skeiðum og undirvísing eigur at verða mett um, um hesi eisini kunnu bjóðast til hini. Avtalað verður frá ferð til ferð, hvørt hetta er uttan ella móti viðurlagi.

Partarnir kunnu heita á viðkomandi deild/depil um, at fakfólk hjá pørtunum móti nærri avtalu hava undirvísing hjá hinum.

AV hevur serkunnleika innan sosialráðgeving og viðkomandi almannaveitingar og –tænastur. AV bjóðar kunning um veitingar/tænastu, lógarbroytingar, praksis v.m.

**HR- og starvsfólkaøkið**

Partarnir bjóða hvørjum øðrum (í tann mun gjørligt og hóskandi) at taka lut í innanhýsis tiltøkum, skeiðum, útbúgvingum o. l. við internum og eksternum skeiðshaldarum, sum verða mett at hava áhuga fyri hesi, og sum pláss er á.

Partarnir halda regluliga kontakt fyri at kunna um ætlað tiltøk v.m. Viðv. kostnaði kunnu summi tiltøk

vera ókeypis, meðan onnur kunnu vera avroknað lutvíst í mun til samlaða kostnaðin. Í triðja føri kunnu partarnir sjálvir hýsa tiltøkum, sum tey bera kostnaðin av. Støða verður tikin til hetta í hvørjum einstøkum føri.

## Fylgiskjal 7 – Felagsgoymslan á LS

LS/KS, AV og KSØ/TK samstarva um innkeyp og menning á inkontinens økinum. Menningin á økinum er fyrst og fremst at menna instruktør-netverkið bæði hvør sær og saman. Endamálið við felags menningini er at veita brúkarunum eina eins veiting uttan mun til, hvønn stovn ella øki brúkarin er knýttur til. Eisini er endamálið at fremja samstarvið millum allar kontinensinstruktørar í landinum.

Viðvíkjandi heimarøktini bjóðar LS seg fram til at veita vørur í sambandi við sárrøkt og umvav, og er LS tilreiðar at gera prís- og samstarvsavtalur. Innan sárrøktarøkið bjóðar veitarin Mølnlycke í samstarvi við LS á hvørjum ári til kunnandi/førleikamennandi tiltak fyri sárbólkin hjá Heimatænastuni. Sárrøktararbeiðið á LS er komið væl í gongd aftur, so væntandi kann tvørgangandi og samskipandi arbeiðið á hesum økinum mennast komandi árini.

Felagsgoymslan arbeiðir málrættað saman við fleiri veitarum innan onnur øki at bjóða fram upplýsandi og mennandi tiltøk. Til dømis veitir Dansac Hollister javnan undirvísing í Føroyum innan stomiøkið. Tiltøkini, sum Felagsgoymslan bjóðar til, hava verið og eru ókeypis. Hendan leistin vilja vit so vítt gjørligt varðveita.

AV, KSØ/TK fær møguleika at bíleggja vørur frá goymsluni beinleiðis í AX-light-skipanini. Við goymsluskipanini, sum væntandi virkar við fullari megi eftir summarfrítíðina, kann Felagsgoymslan bjóða AV, KSØ/TK ein (ella fleiri) licens til at bíleggja beinleiðis umvegis LS heimasíðuna. Hvat viðv. Norðoya Bú- og Heimatænasta verður vøra útflyggjað frá KS.

## Fylgiskjal 8 – Hjálpartólaøkið

**Hjálpitól**
Felagsgoymslan á LS og Fysiurgisk deild á KS umsitur hjálpartól til fyribils tørv hjá sjúklingum, ið verða útskrivaðir frá LS ella KS. Fyribils tørvurin og útlánini eru sum høvuðsregla í mesta lagi í 3 mánaðar. Oftast er talan um sjúklingar, ið hava fingið einhvørja ortopædiska viðgerð/skurðviðgerð.

Í 2015 verður serstakliga arbeitt við tveimum økjum:
a) Arbeitt verður við at menna samstarvið við heimavitjanum soleiðis, at felags heimavitjanir kunnu gerast, tá hetta er til fyrimun fyri brúkaran. Arbeiðsbólkur verður settur at orða arbeiðsgongdir fyri felags heimavitjanir.

b) Møguleikar verða kannaðir at skipa felags innkeyp av hjálpartólum við atliti til at fyriskipa einstáttaða tænastu til brúkaran.

**Skipan innan hjálpitól**

Innleiðing
Fyri at kunna veita borgarum eina so góða tænastu sum gjørligt, er ynskiligt, at LS/KS, AV og KSØ/TK hava eitt tætt samstarv, tá talan er um heimskriving av sjúklingum.

Lógargrundarlag
AV arbeiðir eftir Forsorgarlógini § 18 b, Kunngerð nr. 18 frá 22. mars 2010 um stuðul til hjálpartól og Vegleiðing til kunngerð nr. 18 um stuðul til hjálparráð frá 2. september 2013. Eisini verður arbeitt út frá Vegleiðing til ásetingar um markamót sbrt. § 18 b stk. 5 og 6 um hjálparráð í forsorgarlógini og

sbrt. §§ 7 og 8 í kunngerð nr. 18 um stuðul til hjálparráð. Serlig atlit eru at taka viðvíkjandi fyribils og varandi tørvi og hvagar sjúklingurin verður heimskrivaður (heim, stovn, umlætting) í mun til, hvar ábyrgdin liggur mótvegis markamót.

Eisini heimildar rundskriv um Leiguskipan hjá Hjálpartólamiðstøðini frá 26. mai 2010 at leiga út ávís hjálpartól til einstaklingar til feriunýtslu og til myndugleikar.

Treytir fyri hjálpartól frá AV
Treytin fyri at fáa hjálpartól frá AV er at borgarin **býr heima**, sí tó niðanfyri og hevur **varandi** sjúku/brek – tað vil siga útlit ikki eru fyri bata. Tað er somuleiðis ein treyt at hjálpartólið:

- **Er neyðugt fyri at brúkarin kann vera í arbeiði**
- **Munandi bøtir um varandi avleiðingar av sjúkuni/brekinum**
- **Munandi lættir um gerandisdagin í heiminum**

Stuðul verður veittur til bíligasta nøktandi hjálparráðið

Býr borgarin á stovni kann stuðul einans veitast til persónligt tillagað hjálparráð eftir omanfyri nevndu treytum, um hjálparráðið bert verður nýtt av tí einstaka og verður tikin við, tá ið viðkomandi uppiheldur sær uttanfyri stovnin. Ein koyristólur, sum skal lagast til tann einstaka, og sum tann einstaki hevur tørv á størsta partin av degnum, kemur undir hugtakið persónligt tillagað hjálparráð.

Málsviðgerð og avgreiðslu tíðir
Menningardepilin bólkar umsóknir um hjálparráð soleiðis:
Bráðmál 5 dagar avgreiðsla.
Snarmál 14 dagar.
Vanligmál 30 dagar.
Íbúðarmál 3-6 mðr.

Er talan um vanlig hjálpartól, so sum rolator, vesihækkara, bækkenstól, song og annað, verður tað bólkað sum eitt Snarmál, tó verður altíð hugt eftir nær heimskrivingardagurin er og verður miðað eftir, at tólini eru til taks hjá brúkaranum heimskrivingardagin (3-14 dagar).

Er talan um serlig tól ella ynski um, at terapeutur á Viðskiftadeplinum skal út at gera tørvsmeting, fyri at finna røttu loysnina viðvíkjandi hjálpartólum, verður umsóknin bólkað sum eitt vanligt mál (3-30 dagar).

Húsabroytingar, atkomur, gelendarar v.m. verða bólkað sum Íbúðarmál, og skulu terapeutur og møguliga tøkningur frá Viðskiftadeplinum í heimið, at meta um hvørjar broytingar eru neyðugar og hvussu tær kunnu gerast bíligast forsvarligt.

Er talan um terminalsjúklingar, verður umsóknin bólkað sum eitt Bráðmál og verður alt sett inn fyri at avgreiða málið, so skjótt sum til ber (1-5 dagar).

**Tað skundar undir viðgerðina hjá AV um umsóknir eru tørvsmettar av terpeuti við læknaligari meting um sjúkuútlit, soleiðis at tað framgongur í umsóknini hvat tørvurin er og at talan er um varandi tørv.**

Mannagongd við umsókn
Samband við málsviðgerarnar/terapeutarnar fæst við at venda sær til
Teldupost av@av.fo
Telefon 360000
Telefax 360001

Neyðugt er at lata inn umsóknarblað, ið liggur á www.av.fo – undir oyðubløð.

Er talan um tól har brúkarin skal sita í ella ganga við, er ynskiligt við "kropsmátitalvu".

Er talan um luft-madrassu/pútu vegna trykk/sár, er ynskiligt við "skoritalvu".

Er talan um brúkarar við samansettum tørvi ella størri broytingar í egnum heimi, er ynskiligt at terapeutur frá AV kemur við á heimavitjan saman við terapeuti hjá LS/KS.

Er talan um trygdartelefon, er ynskiligt at spurnaðarblað er útfylt.

Mannagongd í samband við útskrivan
Tá ið borgari skal útskrivast, sum hevur tørv á hjálpartól, skal hettar gerast við umsókn til AV – seinast 48 tímar undan útskrivan - yrkadagar.

Leiga av hjálpartól
LS/KS hevur møguleika fyri at leiga hjálpartól til sjúklingar hjá LS frá AV, fyri ein kostnað ið er ásetur sambært reglunum í rundskrivi frá AMR um Leiguskipan hjá Hjálpartólamiðstøðini

Fyrispurningur um leigumál skal sendast til
Teldupost goymsla@av.fo
Telefon 360000
Telefax 360005

# Fylgiskjal 9 – Endurvenjing (fysioterapi, ergoterapi vm.)

Partarnir fara í fyrru helvt av 2015 at greina og ætlandi innganga bindandi avtalur um
- arbeiðsbýti,
- mannagongdir í mun til samstarv við atliti til serkøna (specialiseraða) endurvenjing á sjúkrahúsi,
- almenna endurvenjing í AV, KSØ/TK,
- eginendurvenjing,
- endurvenjing hjá privatstarvandi,
- viðlíkahaldsvenjing,
- endurvenjingarætlanir,
- fyribyrging,
- góðar samanhangandi tvørgangandi sjúklingagongdir.

Endamálið er at fáa eitt skynsamt arbeiðsbýti við høgari fakligari dygd og høgum framleidni.

# Fylgiskjal 10 – Møgulig framtíðar samstarvsøkir

Partarnir í fleirpartaavtaluni fara í 2015 at samráðast víðari um víðarimenning av samstarvinum. Møgulig evni eru:
- Fyribyrging av lívsstílssjúkum/MARK-faktorar
- Fyribyrja óneyðugum innleggingum
- Sjúklingabúgving (patient empowerment)/Avvarðandi útbúgving
- Sjúklingagongdir (apoplexi o.a.)
- Viðgerð í egnum heimi
- Heilivágur (nýtsla, hjáárin v.m.)
- Talgilt og pappírleyst samstarv/THS implementering v.m.
- Greina orsøkir til liðugt viðgjørdar sjúklingar, ið ikki kunnu útskrivast
- Tvørgangandi samstarv við kommunulæknaskipanina

- Samstarv um heimadialysu (posadialysu)
- Afturboðanarskipan (feedback-skipan) fyri ítøkilig mál í tvørsektorsamstarvinum
- Effektivisering av mannagongdum í sambandi við hjálparráð, hjálpartól § 17 mál v.m.